Frágreiðing frá arbeiðsbólki
viðvíkjandi

# Náttúru-
# &
# Umhvørvisvernd



Dagfesting: 12-07-2001
Mál nr.: 603-200100336-2

INNIHALDSYVIRLIT

INNLEIÐING ..... 4

UM FRÁGREIÐINGINA ..... 5

TILMÆLI ..... 6

UMHVØRVISLÓGIN VIÐ KUNNGERÐUM ..... 11
Løgtingslóg um umhvørvisvernd, nr. 134 frá 29. oktober 1988 ..... 11
Kunngerð um umhvørvisreglur, nr. 53 frá 3. mai 1994 ..... 13
Kunngerð um spillvatnsevju, nr. 186 frá 5. november 1993 ..... 14
Kunngerð um lívrunnið burturkast frá alivinnuni, nr. 40 frá 9. apríl 1992 ..... 14
Kunngerð um burturkast, nr. 147 frá 19. oktober 1995 ..... 15
Kunngerð um umhvørvisgóðkenning av brennistøðum og tyrvingarplássum, nr. 49 frá 2. apríl 1990 ..... 16
Kunngerð um tjalding, nr. 54 frá 9. juni 1989 ..... 17
Kunngerð um oyðing av rottum, nr. 20 frá 16. mai 1962 ..... 17

HAVUMHVØRVISLÓGIN VIÐ KUNNGERÐUM ..... 18
Anordn. om ikrafttr. for Færøerne af lov om beskyttelse af havmiljøet, nr. 646 frá 12. august 1999 ..... 18
Kunngerð um at senda inn fráboðan sambært havumhvørvislógini, nr. 30 frá 8. mars 2001 ..... 19
Kunngerð um móttøkuskipanir í føroyskum havnum fyri leivdir og blandingar av skaðiligum flótandi evnum, ið verða flutt sum leysafarmur (í bulk), nr. 33 frá 8. mars 2001 ..... 19
Kunngerð um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum, nr. 38 frá 8. mars 2001 ..... 20
Kunngerð um nýtslu og burturbeining av evnum og tilfari frá havstøðum, nr. 37 frá 8. mars 2001 ..... 20
Kunngerð um móttókuskipan av oljurestum og blandingum, kloakkavlopsvatni og burturkasti í føroyskum havnum, nr. 20 frá 8. apríl 1987 ..... 21
Kunngerð um fráboðan av upplýsingum um vandamikið ella dálkandi góðs umborð á skipum, nr. 32 frá 8. mars 2001 ..... 22
Kunngerð um umhvørvisgóðkenning av snarferjuleiðum, nr. 36 frá 8. mars 2001 ..... 22
Kunngerð um gjøld eftir havumhvørvislógini, nr. 31 frá 8. mars 2001 ..... 22
Havumhvørviskunngerðir sum danski umhvørvismálaráðharrin er biðin um at seta í gildi fyri Føroyar ..... 23

NÁTTÚRUFRIÐINGARLÓGIN ..... 24
Løgtingslóg um náttúrufriðing, nr. 48 frá 9. juli 1970, sum broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 13. juni 1995 ..... 24

ONNUR UMHVØRVIS- OG NÁTTÚRULÓGGÁVA ..... 26
Lov for Færøerne om bekæmpelse af smitsomme plantesygdomme og skadedyr, nr. 370 af 21. december 1938 ..... 26
Kunngerð um innflutning av djórum og smittuberandi lutum, nr. 55 frá 26. mai 1983, sum broytt við K. nr. 136 frá 5. november 1990 og K. nr. 30 frá 22. mars 1994 um broyting í kunngerð um innflutning av djórum og smittuberandi lutum ..... 26
M.B. om foranstaltninger mod kartoffelbrok, nr. 13 af 18. marts 1942 ..... 27
Lov om midler til bekæmpelse af plantesygdomme m.m., nr. 73 af 23 marts 1932 som ændret ved lov nr. 447 af 22. december 1939 ..... 27
Lov om foranstaltninger mod udbredelse af rustsvampe, nr. 55 af 27. marts 1903 ..... 28
Løgtingslóg um viðarlundir, nr. 53 frá 27. november 1952, sum seinast broytt við løgtinglóg nr. 110 frá 29. juni 1995 ..... 28
Løgtingslóg um avmarking av nýtsluni av freon, nr. 126 frá 3. oktober 1988 ..... 29
Løgtingslóg um bann móti burturkoyring av mold til sjós, nr. 77 frá 12. juli 1984 ..... 29
Løgtinglóg um íløt til øl, miniralvatn og lidnar leskidrykkir, nr. 73 frá 10. mai 1994 sum broytt við lóg nr. 88 frá 4. juli 1996 ..... 30
Løgtingslóg um avgjald á smyrjiolju, nr. 75 frá 13. mai 1992 ..... 30
Kunngerð um bilvrakgrunn, nr. 104 frá 3. november 1989 við heimild í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum, nr. 102 frá 1. oktober 1986 ..... 31

LÓGGÁVA UM VØTN, VATNVEITING OG VATNBURTURVEITING ..... 33
Lov for Færøerne om benyttelse af indsøer og vandløb, nr. 169 af 18. maj 1937 som ændret ved L. nr. 92 af 23. februar 1988 ..... 33

Lov om beskyttelse af vandforsyningsanlæg, nr. 60 af 24. april 1896, sum broytt við lov nr. 127 frá 15. apríl 1930 ... 33
Lov om tilvejebringelse af vedtægt for benyttelse af vand fra Tórshavns vandværk, nr. 48 af 24 marts 1899 ... 34
Lov for Færøerne om vandledninger, nr. 63 af 1. april 1909 ... 34

LÓGGÁVA UM BYGGI- OG BÝARSKIPAN ... 36
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, nr.13 frá 21.05.1954 ... 36

LÓGGÁVA UM HVAL, KÓP, FUGL OG HARU ... 39
Løgtingslóg um hvalaveiðu, nr. 57 frá 5. juni 1984, sum broytt við Ll. nr. 41 frá 2. mai 1986, sum broytt við Ll. nr. 92 frá 13. juni 1995, og sum seinast broytt við Ll. nr. 54 frá 20. mai 1996 ... 39
Kunngerð um undantak fyri friðing av hvali, nr. 19 frá 1. mars 1996 ... 39
Kunngerð nr. 46 frá 8. apríl 1998 um grind ... 39
Ll. um fuglaveiðu v.m., nr. 27 frá 9. september 1954, broytt við Ll. nr. 11 frá 24. februar 1989 ... 40
Kunngerð um ræning av lomvigaeggjum, nr. 60 frá 16. mai 1986 ... 40
Kunngerð um serliga fuglaveiðu, nr. 120 frá 21. november 1986 ... 41
Lov om Ødelæggelse af Ravnens Yngel på Færøerne, nr. 34 af 11. marts 1892, som senest ændret ved L. nr. 92 af 23. februar 1988 ... 41
Løgtingslóg um haruveiðu, nr. 128 frá 25. oktober 1988 ... 41

ALTJÓÐA OG MILLUMTJÓÐA SÁTTMÁLAR ... 42
Convention on the prevention of marine pollution by dumping of waste and other matter (London Convention 1972) ... 42
Convention on the prevention of pollution from ships (Marpol 1973) ... 42
Convention for the protection of the marine environment of the North-East Atlantic (OSPAR) ... 43
UN/ECE Convention on Long-Range Transboundary Air Pollution (Geneva 1979) ... 43
Convention on the Protection of the Ozone Layer (Vienna 1985) ... 44
UN’s Framework Convention on Climate Change (Rio 1992) ... 44
Convention on the Control of Transboundary Movements of Hazardous Wastes (Basel 1989) ... 45
Convention on Oil Pollution Preparedness, Response and Cooperation (London 1990) ... 45
UN/ECE Convention on Environmental Impact Assessment in a Transboundary Context (Espoo, 1991) ... 46
UN/ECE Convention on the Transboundary Effects of Industrial Accidents (Helsinki 1992) ... 47
UN/ECE Convention on Access to Information, Public Participation in Decision-making and Access to Justice in Environmental Matters (Århus 1998) ... 47
Convention on Protection of Wetlands og International Importance especially as Waterfowl Habitat(RAMSAR 1971) ... 48
Convention on the International Trade in Endangered Species of Wild Fauna and Flora – CITES (Washington 1975) ... 48
Convention on the Conservation of Migratory Species of Wild Animals (Bonn 1979) ... 49
Convention on Biological Diversity (1992) ... 49
European Landscape Convention (2000) ... 50

FYRISITINGIN ... 51
Ábyrgdarhavandi stýrir ... 52
Uppskot til skipan innan náttúru, umhvørvi og planlegging ... 54

FYLGISKJAL 1: NÁTTÚRU- OG UMHVØRVISFYRISITING Í ÍSLANDI ... 55

FYLGISKJAL 2: NÁTTÚRU- OG UMHVØRVISFYRISITING Í DANMARK ... 59

FYLGISKJAL 3: VERANDI ÁBYRGDARSKIPAN INNAN UMHVØRVISTÝÐANDI FYRISITING ... 67

FYLGISKJAL 4: VIÐMERKINGAR TIL UPPSKOT TIL LØGTINGSLÓG UM UMHVØRVISVERND ... 68

# INNLEIÐING

Landsstýrismaðurin í umhvørvismálum, Eyðun Elttør, setti 25. juli 2000 ein bólk at arbeiða við fylgjandi arbeiðssetningi:

1. At lýsa støðuna á umhvørvis- og náttúruverndarøkinum við støði í verandi umsiting og galdandi lóggávu
2. At viðgera og vísa á, hvør tørvur er á broytingum innan økið
3. At seta fram hugskot um, hvørjar loysnir kunnu nýtast fyri at fremja tilmæltu broytingarnar í verki

Limirnir í arbeiðsbólkinum hava verið:

- Jacob P. Joensen, formaður, deildarleiðari á Heilsufrøðiligu starvsstovuni
- Rókur Tummasarson, skrivari, fulltrúi í Oljumálastýrinum
- Kate Sanderson, fulltrúi á Løgmansskrivstovuni
- Dorete Bloch, limur í Yvirfriðingarnevndini og stjóri á Náttúrugripasavninum
- Poul A. Joensen, umboð fyri Kommunusamskipan Føroya og stjóri á IRF
- Jógvan Mørkøre, formaður í Føroya Kommunufelag (fram til 9. november 2000). Sveiney Sverrisdóttir, skrivari í Føroya Kommunufelag (frá 9. november 2000).

Eingin var settur burturav at starvast við arbeiðssetninginum.

Tá bólkurin hevði sín fyrsta fund, setti landsstýrismaðurin fram ynski um, at frágreiðingin skuldi verða liðug primo 2001. Landsstýrismaðurin legði dent á, at bólkurin skuldi ikki gera ítøkilig lógaruppskot, men vísa á trupulleikarnar í síni heild, og hvussu man kundi arbeiða víðari við teimum. Harumframt legði landsstýrismaðurin dent á tørvin á at finna loysnir, sum í minst møguligan mun økja um umsitingina av økinum, men sum í mest møguliga mun tryggja eitt reint umhvørvi og varðveitan av eini fjølbroyttari náttúru.

Arbeiðsbólkurin hevur arbeitt í tíðarskeiðnum august 2000 til juni 2001. Arbeiðið hevur verið merkt av, at limirnir í bólkinum hava nógv um at vera í sínum dagliga arbeiði, og at tað ikki hevur verið starvsfólkaorka sett burturav til arbeiðið. Frammanundan er sera lítið gjørt við at greina tað grundarlag, sum náttúrufyrisiting, umhvørvisfyrisiting og planleggingarvirksemi byggir á og kann henda frágreiðing síggjast sum eitt støði at byggja víðari á.

Hóast at arbeiðssetningurin hjá bólkinum ikki hevur verið at orðað ein umhvørvispolitikk, vónar bólkurin, at frágreiðingin kann vera støði undir einum arbeiði at orða ein framtíðar náttúru- og umhvørvispolitikk.

# UM FRÁGREIÐINGINA

Fyrsti arbeiðssetningurin er:
- at lýsa støðuna á umhvørvis- og náttúruverndarøkinum við støði í verandi umsiting og galdandi lóggávu.

Arbeiðsbólkurin hevur valt at savna alla lóggávu, sum kann metast at hava týdning fyri umhvørvis- og náttúruverndarøkið. Ein stutt lýsing av ásetingum í lógum og kunngerðum er gjørd, og ein lýsing av, hvussu hon verður umsitin av myndugleikanum.

Næsti arbeiðssetningurin er:
- at viðgera og vísa á, hvør tørvur er á broytingum innan umhvørvis- og náttúruverndarøkið.

Arbeiðsbólkurin hevur í tilknýti til lýsingina av lóggávuni og umsitingini gjørt eina meting av hesum og eina ávísing av teimum týðiligastu tørvunum á broytingum. Samlaði arbeiðsbólkurin hevur arbeiðsroyndir á økinum, so vitanin um tørvirnar á broytingum var tøk í nevndini.

Triði og seinasti arbeiðssetningurin er:
- at seta fram hugskot um, hvørjar loysnir kunnu nýtast fyri at fremja tilmæltu broytingarnar í verki.

Ætlanin var ikki, at nevndin skuldi gera uppskot til nýggja lóggávu ella líknandi ítøkiligar broytingar. Tí hevur nevndin listað nøkur hugskot, sum byggja á teir týðiligastu tørvirnar á broytingum og á, hvussu okkara grannalond hava skipað seg á økinum.

Frágreiðingin er uppsett soleiðis, at listin yvir "Uppskot til broytingar" er fyrst í frágreiðingini. Harnæst er lýsingin av tí lóggávu, sum kann metast at hava týdning fyri umhvørvis- og náttúruverndarøkið, saman við eini stuttari lýsing av, hvussu hendan lóggáva verður umsitin, meting av hesi lóggávu og ávísing av teimum týðiligastu tørvunum á broytingum. Seinast kemur ein lýsing av føroysku fyrisitingini og í fylgiskjali ein lýsing av fyrisitingini av umhvørvis- og náttúruvernd í øðrum norðurlondum.

Bólkurin nemur við fleiri lógir og kunngerðir, sum ikki verða umsitin av landsstýrismanninum í umhvørvismálum. Fyri at gera eina samlaða lýsing av náttúru- og umhvørvisverndarøkinum, var tað neyðugt at koma inn á hesi økir, ið eru ein integreraður partur av tí náttúru- og umhvørvisrelateraða arbeiðsøkinum hjá fleiri av umboðunum í bólkinum.

Nevndin hevur verið samansett av fólkum, sum í tí dagliga starvast við at fyrisita stórar partar av lógarverkinum innan umhvørvis- og náttúrumál. Hetta merkir, at nevndin í stóran mun eisini hevur fokuserað á teir trupulleikar, sum gera dagligu umsitingina tvørliga.

Arbeiðsbólkurin hevur ikki havt løgfrøðiliga luttøku. Frágreiðingin er sostatt rættiliga avmarkað viðvíkjandi metingum av meira løgfrøðiligum týdningi. Sum uppfylging av hesi frágreiðing vil arbeiðsbólkurin tí mæla til, at sett verður eitt arbeiði ígongd, sum verður framt undir løgfrøðiligari leiðslu, og sum byggir á tey broytingaruppskot, sum arbeiðsbólkurin hevur víst á.

# TILMÆLI

Tørvurin á hægri raðfesting av øllum náttúru- og umhvørvisverndarøkinum er sera stórur. Serliga sjónligur er hesin tørvurin, tá hugt verður eftir, hvussu gamalt lóggávuverkið er, og hvussu lítið er gjørt fyri at fylgja upp uppá altjóða sáttmálar.

Arbeiðsbólkurin er í frágreiðingini komin við fleiri ymiskum hugskotum um ábøtur á skipanina og á lóggávuna. 10 uppskot um broytingar eru tikin fram, sum arbeiðsbólkurin metir eru av størsta týdningi:

1. Mælt verður til skipan av eini samlaðari náttúru-, umhvørvis- og lendisfyrisiting. Hendan fyrisiting skal hava beinleiðis tilvísing til landsstýrismannin í umhvørvismálum.

2. Mælt verður til, at gjørd verður ein byggilóg, sum setur almen krøv til bygging, og ein kommunuplanlóg, sum tryggjar, at náttúru- og umhvørvisverndaráhugamál eru partur av eini landsplanlegging.

3. Mælt verður til, at ein tíðarhóskandi náttúruverndarlóg verður gjørd, har landsstýrismaðurin hevur endaligu ábyrgdina, og har náttúrufriðingarnevndirnar eru umskipaðar til ráðgevandi nevndir hjá landsstýrismanninum.

4. Mælt verður til, at umhvørvisverndarlógin verður endurskoðað, so betri samsvar fæst ímillum fyrisitingarliga orku og tørv á góðkenningum, og at hon verður dagførd, so hon samsvarar við teirri lóggávumenning, sum er farin fram í okkara grannalondum.

5. Mælt verður til at seta serstaka produkt- og kemikaliulóggávu í gildi.

6. Mælt verður til, at munandi meira verður gjørt við at raðfesta altjóða avtalur og við at luttaka í millumtjóða arbeiði, sum fer fram innan umhvørvisvernd.

7. Mælt verður til, at meira verður gjørt fyri at fáa árlig náttúru- og umhvørvishagtøl frá stovnum, kommunum og virkjum.

8. Mælt verður til at gera kunningarvirksemi til ein part av øllum umhvørvistiltøkum og umhvørvisreguleringum soleiðis at kunningarátøk fylgja øllum lógum, kunngerðum og altjóða avtalum sum verða settar í gildi.

9. Mælt verður til at játtanin/stuðulin til umhvørvisverndartiltøk verður hækkað munandi.

10. Mælt verður til at gera lóggávu sum tryggjar at føroyska náttúran og umhvørvið eru vard ímóti óhepnum avleiðingum av nýggjum vinnum, gentøkni o.l.

**Viðmerkingar**

Tá farið varð undir at orða verandi umhvørvisverndarlóg í 1986, var hetta grundað á, at fyrisiting av umhvørvisligum viðurskiftum var sera spjødd í landsumsitingini. Hóast 15 ár eru gingin, so ber framvegis til at vísa á, at tann stóra spjaðingin av umhvørvisligum viðurskiftum framvegis er ein av høvuðstrupulleikunum fyri alla náttúru- og umhvørvisvernd í Føroyum. Ein annar høvuðstrupulleiki er, at hóast umhvørvisverndarlógin kom í gildi í 1989, hevur stórt sæð eingin fyrisitingarorka verið kring lógina, og er hon tí ongantíð rættiliga fingin at virka á flestu økjum. Løgfrøðiligt viðlíkahald av verandi lóggávu hevur ikki verið framt í nógv ár, og enn minni nøkur regluskapan og lóggáva innan nýggj økir. Sostatt er øll náttúrufriðingalóggávan, veiðilógin og byggi- og býarskipanarlóggávan sera ótíðarhóskandi, fyri ikki at tala um ymisk lóggáva, sum manglar heilt, sosum kemikaliu- og produktlóggáva.

Arbeiðsbólkurin hevur í gjøgnumgongdini av lóggávuni staðfest tørv á fleiri broytingum. Hesar eru rættiliga umfatandi; m.a. verður víst á tørvin á eini samskipan av náttúruvernd, umhvørvisvernd og lendisplanlegging í eina fyrisiting. Eisini verður víst á, at neyðugt er at smíða nýggja lóggávu og at endurskoða verandi lóggávu á fleiri økjum. Haraftrat verður víst á tørvin á reglubundnari skráseting, á almennari kunning og á øktum stuðli til menning av øllum náttúru- og umhvørvisverndarøkinum.

Arbeiðsbólkurin hevur fylgjandi 10 uppskot:

**1. Skipan av fyrisiting innan náttúruvernd, umhvørvisvernd og planlegging**

Mælt verður til skipan av eini samlaðari náttúru-, umhvørvis- og lendisfyrisiting. Hendan fyrisiting skal hava beinleiðis tilvísing til landsstýrismannin í umhvørvismálum.

Umhvørvisvernd er eitt sera breitt samansett og tvørgangandi arbeiðsøki, sum í stóran mun er tengt at náttúruvernd og lendisplanlegging. Í viðurkenning av, at munadyggar umhvørvisábøtur eisini krevja altjóða reguleringar, er ein stórur partur av arbeiðsøkinum altjóða virksemi. Um náttúru- og umhvørvisverndin skal mennast til tað støðið, sum er kent frá grannalondum okkara, so er neyðugt at skipa eina samlaða fyrisiting innan náttúru, umhvørvi og planlegging.

Í dag er náttúrufriðing og umhvørvisvernd málsøkir hjá landsstýrismanninum í umhvørvismálum, men ein fyrisiting innan náttúru- og umhvørvisvernd kundi við fyrimuni eisini umfata lendisskipanir. Hendan fyrisiting skuldi eisini verið virkin innan viðgerð av altjóða avtalum, framt skrásetingar og uppgerðir og kunnandi virksemi innan alt náttúru- og umhvørvisøkið. Somuleiðis skuldi hendan fyrisiting kunna gjørt avtalur við stovnar og feløg um at røkja nærri útgreinaðar fyrisitingaruppgávur.

**2. Lendisplanlegging, nýggj byggilóg og kommunuplanlóg**

Mælt verður til, at gjørd verður ein byggilóg, sum setur almen krøv til bygging, og ein kommunuplanlóg, sum tryggjar, at náttúru- og umhvørvisverndaráhugamál eru partur av eini lendisplanlegging.

Tað manglar ein lóg, sum greinar bygging, lendisregulering og annars setur almenn krøv til bygging. Ein byggilóg og ein kommunuplanlóg eiga at verða settar í gildi fyri Føroyar, og hendan lóggáva eigur at samskipast við aðra lóggávu, t.d. náttúrufriðingarlóggávu og umhvørvisverndarlóggávu.

Landstýrismaðurin í umhvørvismálum hevur sambært kap. 9 í løgtingslóg um umhvørvisvernd møguleika fyri at gera kortleggingar og dygdarætlanir sum stuðul undir lendis- og kommunuplanlegging. Menningin og útbyggingin av landinum skal soleiðis fara fram við atliti til heilsu- og umhvørvisviðurskiftir.

Tørvur er á umhvørvisviðgerð innan planlegging í kommununum, eins og í landinum yvirhøvur, t.d. í sambandi við ídnaðarøkir, spillvatnsætlanir og nýtslu av vøtnum og firðum. Planleggingin eigur at umfata grøn kort, herundir lýsing av lívfrøðiligum margfaldni, lendisskipan o.t. Tílík lendisplanlegging vil lætta um dagligu fyrisitingina hjá kommunum og landsmyndugleikum innan náttúru- og umhvørvisverndarøkið.

## 3. Nýggj náttúruverndarlóg

Mælt verður til, at ein tíðarhóskandi náttúruverndarlóg verður smíðað, har landsstýrismaðurin hevur endaligu ábyrgdina, og har náttúrufriðingarnevndirnar eru umskipaðar til ráðgevandi nevndir hjá landsstýrismanninum.

Náttúruverndarlógin eigur at verða samskipað við umhvørvisverndarlóg, byggi- og planlóggávu og forminnislóggávu. Eftirlitið við friðaðum djórum, vøkstri og livistøðum eigur somuleiðis at verða skipað í somu fyrisiting.

Øll eiga at hava møguleikan at leggja fram uppskot um friðing. Náttúrugripasavnið, Fornminnissavnið og lokalu friðingarnevndirnar skulu viðgera uppskot um friðing og ráðgeva landsstýrismanninum eftir umbøn. Landsstýrismaðurin tekur síðan endaliga avgerð um friðing, aftaná at uppskotið hevur verið lagt fram til almenna hoyring.

## 4. Endurskoðan av umhvørvisverndarlógini

Mælt verður til, at umhvørvisverndarlógin verður endurskoðað, so betri samsvar fæst ímillum fyrisitingarliga orku og tørv á góðkenningum, og at hon verður dagførd, so hon samsvarar teirri lóggávumenning, sum er farin fram í okkara grannalondum.

Tað er í dag ein stórur tørvur á dagføring av umhvørvisverndarlógini soleiðis, at lógin tekur hædd fyri teimum trupulleikum, sum hava víst seg, síðan hon kom í gildi.

Neyðugt er við ábøtum, so samsvar fæst ímillum fyrisitingarliga orku og tørv á góðkenningum sambært lógini. Hetta kann gerast við at:

- gera kunngerðir fyri virkisbólkar og virksemi og harvið skapa grundarlag fyri at seta hesar uttanfyri góðkenningarskyldu.
- áseta nýtt mark fyri, nær virkir ella virksemi eru av eini slíkum slag ella slíkari støðd, at tørvur er á góðkenning.

- áseta, hvørji skjøl og kanningar, t.d. umhvørvistøknilig lýsing og vandagreiningar, skulu liggja sum støði fyri umhvørvisgóðkenningini.
- áseta góðkenningargjøld, sum samsvara teimum útreiðslum, sum góðkenningarviðgerðin inniber.

Fyri at fáa arbeiðið við umhvørvisgóðkenningum liðugt, eigur somuleiðis at verða ásett í kunngerð, nær ávísar vinnugreinar skulu hava søkt um góðkenning. Á henda hátt verða øll virkir innan somu vinnugrein viðgjørd samstundis og fáa somu treytir at virka undir, óheft av, um tey eru bygd fyri ella eftir, at umhvørvisverndarlógin kom í gildi 01.01.1989.

Neyðugt er, at eftirlitið við lóggávu og góðkenningum er soleiðis skipað, at manglandi arbeiðsorka ikki tarnar einum neyðugum eftirliti. Sostatt má eftirlitið gerast útreiðsluneutralt, t.d. við at áseta eitt eftirlitsgjald, sum samsvarar útreiðslurnar av eftirlitinum. Somuleiðis eigur at verða møguligt at leggja eftirlitsuppgávur út til frammanundan góðkendar persónar ella fyritøkur at fremja.

Umhvørvisviðkvæmt virksemi eigur at skipast við góðkendum fólkum ella feløgum.

Tørvur er á gerð og endurskoðan av reglum innan landbúnaðin. Hesar reglur eru ikki tilrættaðar, hóast stórar broytingar eru farnar fram, sum m.a. hava havt við sær, at virknir garðar eru vaksnir munandi, meðan aðrir er givnir við djórahaldi.

Týdningurin av umhvørvisverndarátøkum við tí endamáli at avmarka tey mest álvarsomu dálkingarfyribrigdini er framvegis eins stórur ídag og hann var tá umhvørvisverndarlógin var sett í gildi. Samstundis er umhvørvisvernd vorðin ein alt størri partur av tí samfelagsligu menning, sum er farin fram uttanlanda og ger hetta, at eisini tann marknaðarligi týdningurin av at hava eina tíðarhóskandi umhvørvisverndarlóggávu er vaksin munandi.

## 5. Kemikaliu- og produktlóggáva gerast

Mælt verður til at seta serstaka produkt- og kemikaliulóggávu í gildi.

Øll lóggávan á hesum øki eigur at verða kannað. Eisini er neyðugt við eini støðugari lóggávuuppfylging soleiðis, at kemikaliur og vørur annars, sum av umhvørvisáðum verða bannað í londunum kring okkum, t.d. kyksilvur í termometrum og øðrum, eisini verða tikin av føroyska marknaðinum.

## 6. Altjóða avtalur raðfestast

Mælt verður til, at munandi meira verður gjørt við at raðfesta altjóða avtalur og við at luttaka í millumtjóða arbeiðið, sum fer fram innan umhvørvisvernd.

Umhvørvisøkið er í sera stóran mun regulerað av konventiónum. Í Føroyum hevur lítið verið gjørt við at luttaka í arbeiðinum við altjóða avtalum, og innlitið í hesar avtalur er av somu orsøk sera avmarkað. Tá vit samstundis hava eitt avmarkað tal av lógum og kunngerðum innan náttúru- og umhvørvisverndarøkið, so vil staðfestingin av eini altjóða avtalu ofta innibera rættiliga stóran tørv á tillaðingum. Ofta verða neyðugar lógartillagingar ongantíð gjørdar, og er rættarstøðan á økinum tí rættiliga ógreið.

Støðan á økinum er ikki í samsvar við tann týdning, sum altjóða avtalur hava fyri tað støðuga arbeiðið við at avmarka dálking. Umráðandi er, at føroysk sjónarmið verða gjørd galdandi á ávísum serliga týðandi økjum, sosum innan havumhvørvisvernd.

## 7. Betra um skrásetingar

Mælt verður til, at meira verður gjørt fyri at fáa árlig náttúru- og umhvørvishagtøl frá stovnum, kommunum og virkjum.

Stórur mangul er á skipan av hagtølum fyri nýtslu og útlát soleiðis, at hesi kunnu nýtast sum støði undir umhvørvisábøtum og í altjóða frágreiðingum. Lætt atkomuligar almennar skrásetingar vildu haraftrat betra um gjøgnumskygni av umhvørvisviðurskiftum.

## 8. Tørvur á kunning og upplýsing

Mælt verður til at gera kunningarvirksemi til ein part av øllum umhvørvistiltøkum og umhvørvisreguleringum soleiðis, at kunningarátøk fylgja øllum lógum, kunngerðum og altjóða avtalum, sum verða settar í gildi.

Kunning um umhvørvisviðurskiftir og góðan umhvørvisatburð er neyðug, um betrast skal um umhvørvishugburðin, og hava serliga borgarar, vinna og feløg víst á hendan tørv.

## 9. Øktur stuðul til umhvørvisverndartiltøk

Mælt verður til, at játtanin til umhvørvisverndartiltøk verður hækkað munandi.

Ein av fortreytunum fyri at røkka málum innan umhvørvis- og náttúruverndarøkið er, at landsstýrismaðurin hevur møguleika fyri at veita stuðul til verkætlanir av serligum týdningi.

Upphæddin, sum í dag verður játtað til umhvørvisverndartiltøk, eigur at hækka so mikið, at tað eisini gerst møguligt at lýsa eftir áhugaðum umsóknum, eftir eini frammanundan ásettari raðfesting hjá landsstýrismanninum.

## 10. Serlóggáva

Mælt verður til at gera lóggávu, sum tryggjar, at føroyska náttúran og umhvørvið eru vard ímóti óhepnum avleiðingum av nýggjum vinnum, gentøkni o.l.

Hugt eigur at verða eftir tí samlaðu náttúru- og umhvørvisverndarlóggávuni. Stórur tørvur er á lóggávu fyri nýggj fyribrigdir, sum kunnu hava sera stóran umhvørvisligan týdning, t.d. lóg um umhvørvisárinsmetingar og lóg um "genmodifiseraðar" verur.

# UMHVØRVISLÓGIN VIÐ KUNNGERÐUM

## Løgtingslóg um umhvørvisvernd, nr. 134 frá 29. oktober 1988

### Virkisøki

Lógin er fyrsta føroyska umhvørvisverndarlógin. Áðrenn lógin varð sett í gildi, vóru tær galdandi reglurnar á umhvørvisøkinum ásettar í heilsusamtyktum og einstøkum øðrum lógum, sum t.d. í lógini um vatn og áir frá 1937.

Lógin er ein rammulóg. Hon ásetur reglur fyri virksemi, har útleiðingar kunna elva til dálking, umframt vandamikið virksemi, har óhapp ella rakstrartrupulleikar kunnu elva til dálking.

Lógin gevur landsstýrismanninum heimildir til at áseta ymiskar ítøkuligar reglur, um vandi er fyri umhvørvisdálking. Tað kann vera reglur sum t.d. at:

- tryggja reinføri í svimjihøllum, tjaldingarstøðum, matstovum o.l.
- áseta, hvussu rottutýning skal fara fram
- áseta reinleikan og nýtsluna av evnum
- áseta, at útbúnaður skal vera av góðkendum slagi
- seta bann fyri innflutningi av evnum ella vørum
- áseta, at ætlanir um t.d. vega- og havnagerð skulu leggjast fyri landsstýrið

Lógin heimilar landsstýrismanninum at tryggja vatnveitingaráhugamál við at friða vatnveitingarøkir. Landsstýrismaðurin ásetur eisini reglur fyri reinsing og útleiðing av spillvatni.

Serliga dálkandi virksemi má ikki vera farið ígongd, fyrr enn landsstýrismaðurin hevur veitt góðkenning til slíkt. Fyritøkur, virkir og útbúnaður, sum eru nevnd á fylgiskjalinum til lógina, eru at rokna sum serliga dálkandi virksemi.

Lógin fyriskrivar, at landstýrismaðurin í umhvørvismálum saman við einstøku kommununum kann kortleggja dálkingarstøðuna í landinum. Talan er m.a um kortlegging av óljóði, spillvatni og luftdálking. Grundað á kortleggingina skal leggjast ein dygdarætlan fyri vatnøkir og fyri staðfesting av virksemi.

Víst verður annars til fylgiskjal 1 um viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um umhvørvisvernd.

### Umsiting

Í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, eru partar av lógini lagdir yvir á Heilsufrøðiligu starvsstovuna. Samstundis hevur kommunali myndugleikin enn ábyrgd av burturkasti, spillvatni, rottutýning v.m.

Lógin ásetur, at avgerðir tiknar av kommunala myndugleikanum kunnu kærast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, meðan avgerðir hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni kunnu kærast til Føroya landsstýri, t.v.s. landsstýrismannin.

## Meting

Lógin er fyrsta rammulógin á umhvørvisverndarøkinum. Hon líkist nógv donsku lógini, sum var galdandi seinast í 1980 árunum.

Lógin er grundleggjandi nýtilig, men stórir partar av lógini eru ikki virknir. Tað vanta hópin av ítøkiligum kunngerðum, reglum og vegleiðingum, har markvirðir og líknandi verða ásett. Hetta ger lógini torføra at umsita, tí tað í stóran mun verður upp til tann einstaka málviðgeran at áseta treytir og støði fyri verndararbeiði í Føroyum. Vanliga nýta málsviðgerarnir danskar ella aðrar norðurlendskar treytir sum støði undir avgerðum.

Ein berandi partur av lógini, ásetingin um umhvørvisgóðkenningar av serliga dálkandi virksemi, er framhaldandi sera illa fylgd upp. Hóast tað eru 12 ár síðani, at lógin varð sett í gildi, er bert umleið 10% av tí virksemi, sum skal góðkennast, umhvørvisgóðkent.

Ásetingin um umhvørvisgóðkenning er ikki galdandi fyri virkir, sum eru bygd frammanundan ígildiskomuna av umhvørvisverndarlógini, og eru tað tí bert útbyggingar og nýggj virkir, sum skulu hava umhvørvisgóðkenning, hesi fáa harvið harðari rakstrartreytir ásettar enn tey eldru.

Ein annar berandi partur av lógini, sum als ikki er nøktandi røktur, er kortleggingin av dálkingarstøðuni í landinum og samankoyringin av hesum við lands- og kommunuætlanir.

Ásetingin í lógini um reinføri í svimjihøllum og um rottur er ongantíð blivin virkin.

Ein mangul er eisini, at tað ikki er álagt landsmyndugleikum og kommunumyndugleikum at kunna almenningin um umhvørvisspurningar, og hvussu vit varðveita eitt reint umhvørvi í gerandisdegnum.

## Ábøtur

Politiski myndugleikin í Føroyum má taka eina avgerð um, á hvørjum støði vit skulu liggja, og við støði í tí gera ítøkuligar reglur um, hvat og hvussu nógv kann leiðast út í umhvørvið, tað veri seg jørð, vatn og luft. Hetta vil gera tað lættari hjá vinnuni at framleiða nýtiligar umsóknir og hjá myndugleikunum at viðgera hesar.

Eisini eigur at verða hugt at, um ávísar vinnugreinar skulu takast av listanum yvir virksemi, sum skal góðkennast. Ístaðin kunnu gerast kunngerðir fyri hesar vinnugreinar og ásetast, at øll virkir, sum fylgja hesum reglum, sleppa undan mannagongdini við umhvørvisgóðkenning. Tað tekur sjálvandi tíð og orku at gera slíkar kunngerðir, men á henda hátt ber til at lúka burtur úr listanum yvir virkir, sum skulu hava umhvørvisgóðkenning, og soleiðis í longdini avmarka tørvin á fyrisitingarorku.

Fyri at fáa gongd á góðkenningararbeiðið, eigur at verða ásett í kunngerð, nær ávísar vinnugreinar skulu hava søkt um góðkenning, og hvat umsóknin skal innihalda. Á henda hátt verða øll virkir innan somu vinnugrein viðgjørd samstundis og fáa somu treytir álagdar, óheft av, um tey eru bygd fyri ella eftir, at umhvørvisverndarlógin kom í gildi.

Skal fyrisitingarorkan til veitan av góðkenningum og fremjan av eftirliti fáast í samsvar við tann tørv, sum er á góðkenningum og eftirliti, er neyðugt at fáa í gildi aðra fyrisitingarskipan. T.d. kundi

ein skipan við góðkenningar- og eftirlitsgjaldi verið ein møgulig betran av hesum viðurskiftum, eins og gjørt verður í grannalondunum, og sum er sett í gildi innan fyriskipanina fyri havumhvørvið.

Sambært kap. 9 í umhvørvisverndarlógini hevur landsstýrismaðurin í umhvørvismálum ein týðandi leiklut í lendis- og kommunuplanleggingini. Tørvur er á, at landsstýrismaðurin í umhvørvismálum gerst ein virkin partur í lendisplanleggingini, soleiðis sum lógin ásetur. Menningin og útbyggingin av landinum eigur at fara fram við atliti til heilsu- og umhvørvisviðurskifti. Hetta er neyðugt, um sleppast skal undan, at myndugleikarnir seinni renna seg inn í kærur orsakað av, at t.d. virkir eru staðsett í skeivum nærumhvørvi. Haraftrat høvdu frammanundan tilrættislagdar ætlanir lætt nógv um dagligu fyrisitingina hjá kommunum og landsmyndugleikum á umhvørvisøkinum.

## Kunngerð um umhvørvisreglur, nr. 53 frá 3. mai 1994

### Virkisøki

Kunngerðin um umhvørvisreglurnar kom í staðin fyri gomlu kunngerðirnar um heilsusamtyktir, og eru ásetingarnar í umhvørvisreglunum eisini rættiliga líkar teimum, sum vóru í heilsusamtyktunum.

Kunngerðin inniheldur ítøkiligar reglur um alment reinføri, um ampar av vinnuligum virksemi og ávísum frítíðarvirksemi, um vernd av vatnveitingarlendum, um vernd av baðivatni, um spillvatn og drenvatn, um fólkarúm, um rottangar og spillvatn frá rottangum, um húsdjórahald, um køstar og brunnar og um kirkjugarðar.

Ein rættiliga týðandi áseting í kunngerðini er ásetingin um, at kommunali myndugleikin hevur ábyrgdina av tí virksemi, sum ikki er umfatað av kap. 5 í umhvørvisverndarlógini.

Sambært kunngerðini kann kommunali myndugleikin seta ymiskar reglur í gildi, tá ið hesar eru góðkendar av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

### Umsiting

Kommunali myndugleikin hevur ábyrgdina av, at allar ásetingarnar í kunngerðini verða fylgdar. Tó kann kommunali myndugleikin leggja sínar eftirlitsuppgávur yvir til ein kommunufelagsskap ella Heilsufrøðiligu starvsstovuna.

Higartil hava 9 kommunur í Sundalagnum lagt sínar umsitingaruppgávur í ein felagsskap.

Virksemi, sum eitt kommunustýri eigur í ella rekur, er undir eftirliti av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Avgerðir hjá kommunustýrum kunnu kærast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, meðan avgerðir hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni kunnu kærast til Føroya landsstýri.

### Meting

Tað er ójavnt, hvussu virknar kommunurnar eru á umhvørvisøkinum. Tíðum enda kærur um ampar frá vinnuligum virksemi, sum kommunur hava ábyrgd av, á borðinum hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, tí kommunurnar ikki áseta nøktandi treytir fyri virkemið. Sum heild kann sigast, at

tað tykist torført hjá kommununum at loysa mál á umhvørvisøkinum, uttan at taka Heilsufrøðiligu starvsstovuni uppí sum serkunnleika. Hetta er óheppið, av tí Heilsufrøðiliga starvsstovan er kærumyndugleikin fyri avgerðir tiknar av kommununum.

Hesi seinastu árini hava kommunurnar lagt dent á at loysa spillvatnstrupulleikarnar.

### Ábøtur

Ítøkiligar kunngerðir um spillvatnsviðurskifti, húsdjórhald, fýringsútbúnað og øll tey viðurskiftini, sum kommunurnar annars umsita, eiga at verða lýstar, fyri at lætta um arbeiðið hjá kommunum og landsmyndugleikum.

## Kunngerð um spillvatnsevju, nr. 186 frá 5. november 1993

### Virkisøki

Kunngerðin inniheldur ásetingar um tøming, viðgerð og nýtslu av spillvatnsevju frá rottangum.

Kunngerðin áleggur kommunala myndugleikanum at gera eina ætlan fyri tøming av rottangum, sum skal góðkennast av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Sambært kunngerðini skal viðgerð og goymsla av evju fara fram á plássum, sum eru góðkend sambært kap. 5 í umhvørvisverndarlógini.

Avfongd evja kann nýtast til jarðáskot ella tøð eftir góðkenning frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, tó ikki í havabrúkum og urtagørðum.

Kunngerðin heimilar kommunala myndugleikanum at áseta gjald fyri tøming av rottangum.

### Umsiting

Kommunali myndugleikin hevur eftirlitið við, at ásetingarnar verða fylgdar. Avgerðir hjá kommunustýrum kunnu kærast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, meðan avgerðir hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni kunnu kærast til Føroya landsstýri.

### Meting

Tórshavnar kommuna hevur egnu tømingar- og viðgerðarskipan, meðan hinar kommunurnar hava latið uppgávuna yvir til IRF at røkja. Skipanirnar virka væl, men hevur viðgjørda evjan higartil mest verið nýtt til áskot á tyrvingarplássum.

## Kunngerð um lívrunnið burturkast frá alivinnuni, nr. 40 frá 9. apríl 1992

### Virkisøki

Kunngerðin er galdandi fyri alt lívrunnið burturkast, sum stavar frá alistøðum, smoltstøðum, sláturvirkjum og líknandi støðum.

Kunngerðin áleggur nevndu støðum at hava góðkenda skipan til uppsamling, goymslu og flutning av lívrunnum burturkasti. Harumframt verður ásett, hvussu títt deyðfiskur skal samlast upp, og hvørjar skrásetingar skulu gerast í sambandi við tað lívrunnað burturkastið.

Kunngerðin ásetur gjald fyri góðkenning og eftirlit av skipanunum.

**Umsiting**

Heilsufrøðiliga starvsstovan góðkennir og hevur eftirlitið sambært kunngerðini.

Avgerðir eftir kunngerðini kunnu kærast til Føroya landsstýri.

**Meting**

Í byrjanini av 1990 árunum góðkendi Heilsufrøðiliga starvsstovan so at siga allar skipanirnar, og hevur stovnurin síðani árliga sent út spurnarbløð til alarar, virki og móttakarar av lívrunnum burturkasti, fyri at hava eftirlit við burturkastinum.

## Kunngerð um burturkast, nr. 147 frá 19. oktober 1995

**Virkisøki**

Kunngerðin er galdandi fyri alt burturkast, sum ikki verður skipað eftir aðrari lóggávu, ella eftir góðkenning sambært kap. 5 í umhvørvisverndarlógini.

Kunngerðin áleggur kommunala myndugleikanum at savna inn húsarhaldsburturkast og serliga dálkandi burturkast, umframt at vísa á avhendingarmøguleika fyri burturkastið.

Kunngerðin áleggur øllum at nýta ta burturkastsskipan, sum kommunali myndugleikin vísir á. At lata burturkast, bilvrak, fiskaslógv o.t. liggja og rekast í haga, fjøru ella aðrastaðni er bannað. Somuleiðis er bannað at brenna burturkast uttan loyvi frá kommunala myndugleikanum ella Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Loyvt er tó at brenna óviðgjørdan við og pappír í eldstaði við hús, um hetta ikki er til ampa fyri onnur.

Kunngerðin áleggur handlum o.l at hava uttandura ruskíløt.

Kunngerðin heimilar kommunala myndugleikanum at seta virkjum, stovnum o.t. krøv um samansetingina av burturkastinum, umframt at gera kanningar av burturkastinum og tess ávirkan á umhvørvið.

Kommunali myndugleikin kann áseta eitt gjald fyri burturkastsskipanina eftir góðkenning frá Føroya landsstýri.

### Umsiting

Kommunali myndugleikin hevur eftirlitið við, at ásetingarnar verða fylgdar. Tó kann kommunali myndugleikin leggja sínar eftirlitsuppgávur til ein kommunufelagsskap ella Heilsufrøðiligu starvsstovuna.

Avgerðir hjá kommunustýrum kunnu kærast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, meðan avgerðir hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni kunnu kærast til Føroya landsstýri.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlitið við, at kommunali myndugleikin røkir sínar uppgávur sambært kunngerðini.

### Meting

Kunngerðin er yvirhøvur ílagi, men eitt meira virki kommunalt eftirlit og betri upplýsingararbeiði átti at verið skipað í skúlum og fjølmiðlum. Tórshavnar kommuna hevur egna burturkastsskipan, meðan hinar kommunurnar hava latið uppgávuna yvir til IRF at røkja.

### Ábøtur

Eitt virknari kommunalt eftirlit og betri upplýsingararbeiði átti at verið skipað í skúlum og fjølmiðlum. Her er neyðugt at skapa eina grundleggjandi hugburðsbroyting um burturkast og tilfeingisspill hjá fólki soleiðis, at tiltøk verða væl móttikin og fram í verki.

## Kunngerð um umhvørvisgóðkenning av brennistøðum og tyrvingarplássum, nr. 49 frá 2. apríl 1990

### Virkisøki

Kunngerðin ásetur, at breninstøðir og tyrvingarpláss skulu søkja um umhvørvisgóðkenning innan hálvt ár aftaná, at kunngerðin bleiv sett í gildi.

### Umsiting

Heilsufrøðiliga starvsstovan veitir umhvørvisgóðkenningar.

### Meting

Kunngerðin hevur tænt sínum endamáli. Báðar brennistøðirnar og øll tyrvingarplássini eru góðkend í dag.

### Ábøtur

Kunngerðin kundi verið avtikin, tí hesi pláss eru øll umfatað av listanum yvir virksemi, sum skal umhvørvisgóðkennast.

## Kunngerð um tjalding, nr. 54 frá 9. juni 1989

### Virkisøki

Kunngerðin ásetur, at tjalding bert er loyvd har, ið nøktandi nátthus og vaskiumstøður eru til staðar.

### Umsitingarmyndugleiki

Kommunurnar hava ábyrgdina av, at ásetingin í kunngerðini verður hildin.

### Meting

Kunngerðin kann tulkast soleiðis, at tað er bannað at seta tjøld upp í haga og aðrastaðni, har nøktandi spillvatnsviðurskifti ikki eru tilstaðar. Hetta má sigast at vera óheppið, tí tað setur forðingar fyri vanligum skótavirksemi og atgongdini hjá øðrum bólkum til náttúruna.

### Ábøtur

Mælt verður til, at nærri leiðreglur verða gjørdar um, hvussu farast skal fram við tjalding uttan fyri vanlig tjaldingarøkir.

## Kunngerð um oyðing av rottum, nr. 20 frá 16. mai 1962

### Virkisøki

Lógin ásetur neyvari reglur fyri, hvussu rottutýning skal fara fram.

### Umsiting

Kommunurnar hava ábyrgdina av, at reglurnar verða fylgdar.

### Meting

Henda kunngerð hoyrir nú heima undir lóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, har lóg nr. 40 frá 1. juni 1961 er sett úr gildi og ásett er, at kunngerðin framvegis er galdandi.

Kunngerðin verður mett ótíðarhóskandi. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur gjørt eitt uppskot til nýggja kunngerð, sum liggur til avgreiðslu hjá Oljumálastýrinum.

### Ábøtur

Uppskotið til nýggja kunngerð eigur at setast í gildi.

# HAVUMHVØRVISLÓGIN VIÐ KUNNGERÐUM

## Anordn. om ikrafttr. for Færøerne af lov om beskyttelse af havmiljøet, nr. 646 frá 12. august 1999

### Virkisøki

Fyriskipanin setur í gildi donsku havumhvørvisverndarlógina frá 1993. Tó eru allar heimildir innanfyri føroyska fiskimarkið hjá Føroya landsstýri.

Lógin ásetur reglur, sum skulu fyribyrgja og avmarka dálking og onnur árin á serstakliga havumhvørvið. Harumframt ásetur lógin reglur fyri tilbúgving ímóti dálkan á havi, fjøru og havnum.

Lógin setur bann fyri útleiðing av olju á føroyskum sjóøki.

Lógin setur bann fyri søkkjan av evnum og tilfari. Undantikið er tó søkking av botntilfari, sum ikki inniheldur meira enn eina ávísa nøgd av kemiskum evnum, umframt søkking av træskipum fram til 2004.

Lógin setur bann fyri tøming av burturkasti á føroyskum sjóøki. Undantikið er tó frískur fiskur ellar partar av hesum frá skipum.

Lógin heimilar landsstýrismanninum at gera reglur fyri útleiðing, ella aðra burturbeining av evnum og tilfari, ið stavar frá kanningum og/ella útvinnan av kolvetni.

Lógin setur bann fyri brenning av burturkasti á føroyskum sjóøki. Undantikið er tó brenning av vanligum rakstrarburturkasti frá skipum og havstøðum.

Lógin heimilar landsstýrinum at gera reglur fyri brenning av vanligum rakstrarburturkasti frá havstøðum.

### Umsitingar

Av tí at lógin er ein donsk fyriskipan (anordning), er tað danski umhvørvisráðharrin, ið hevur yvireftirlitið við lógini.

Føroya landsstýri hevur tó avgerðarmyndugleikan, tá ið talan er um føroyskt øki.

Kommunurnar hava ábyrgd av tilbúgving í sambandi við dálking av strondum og havnum. Føroya landsstýri hevur ábyrgd av tilbúgving í sambandi við dálking av havinum og sjóøkinum nær landi.

Lógin er partur av málsøkinum hjá Oljumálastýrinum. Partar av lógini eru útgreinaðar í kunngerðum, sum verða umsitnar av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Lógin er ein donsk fyriskipan. Danska lógin er broytt, síðan henda varð sett í gildi. Serliga viðvíkjandi umsiting av ymiskum kunngerðum, t.d. er tann tøkniliga metingin av skipum løgd til

Søfartstyrelsen. Hetta merkir, at arbeiðsøkið hjá danska umhvørvisstýrinum er størri eftir tí føroysku lógini enn eftir galdandi donsku lógini.

Lítil og eingin regulering hevur verið á havumhvørvisøkinum áður, og tí má roknast við, at umsitingin av regluverkinum hevur við sær størri tørv á fyrisitingarligari orku. Hesar avleiðingar fara helst serliga at raka Heilsufrøðiligu starvsstovuna.

Sambært samtykt á løgtingi um sjálvstýri Føroya Fólks er avgjørt at málsøkið skal yvirtakast innan januar 2002.

### Ábøtur

Lógin má endurskoðast.

## Kunngerð um at senda inn fráboðan sambært havumhvørvislógini, nr. 30 frá 8. mars 2001

Kunngerðin ásetur, at skipførarar, flogskiparar, leiðarar á havstøðum og havnarmyndugleikar skulu boða Vaktar- og Bjargingartænastuni o.ø. myndugleikum frá, um dálking er farin fram av havøki.

Ásett er, hvørjar upplýsingar skulu sendast við fráboðanum.

### Umsiting

Vaktar- og Bjargingartænastan umsitur kunngerðina, men í teimum førum, har ið talan er um fráboðanir um dumping ella brenning, sum eru sendar útlendskum myndugleikum, av tí at talan er um dálking uttan fyri føroyskt mark, verður málið latið Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

## Kunngerð um móttøkuskipanir í føroyskum havnum fyri leivdir og blandingar av skaðiligum flótandi evnum, ið verða flutt sum leysafarmur (í bulk), nr. 33 frá 8. mars 2001

### Virkisøki

Kunngerðin ásetur, at havnir, sum móttaka leivdir og blandingar frá skipum og havstøðum, sum innihalda skaðilig flótandi evni, skulu hava góðkenda móttøkuskipan.

Kunngerðin staðfestir, at lóg um umhvørvisvernd og kunngerðir sambært hesi lóg eru galdandi fyri stovnsetan og rakstur av móttøkuskipanum.

Kunngerðin heimilar Heilsufrøðiligu starvsstovuni at áleggja virkjum, ið senda ella taka ímóti skaðiligum flótandi evnum, og skipasmiðjum, ið umvæla tangaskip, at stovna móttøkuskipan til skaðiligt barlast- og tangaskolivatn.

Kunngerðin heimilar eisini Heilsufrøðiligu starvsstovuni, í samráð við Føroya landsstýri, at geva havnarstýrum og fyrrnevndu virkjum boð um at fremja útbyggingar av móttøkuskipanunum, um hesar hava ov lítla orku og føra til seinkingar hjá skipum.

### Umsiting

Heilsufrøðiliga starvsstovan umsitur kunngerðina. Avgerðir hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni kunnu kærast til landsstýrismannin.

### Meting

Hendan kunngerðin saman við kunngerð nr. 20 frá 08.04.1987 um móttøkuskipan fyri oljurestir v.m. í føroyskum havnum eru rættiliga líkar. Tann eina fevnir um leivdir v.m. av evnum, ið verða flutt sum leysafarmur, meðan hin kunngerðin fevnir um burturkast v.m. Í Danmark eru hesar kunngerðir nýliga lagdar saman í eina.

### Ábøtur

Kunngerðin eigur at skrivast saman við kunngerð nr. 20 frá 08.04.1987.

## Kunngerð um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum, nr. 38 frá 8. mars 2001

### Virkisøki

Kunngerðin ásetur, hvørjar treytir eru galdandi fyri at fáa loyvi at søkkja tilfar, sum er tikið upp av havbotninum. Lýst verður, hvørjar upplýsingar skulu vera í umsóknini um loyvi.

Heilsufrøðiliga starvsstovan kann krevja, at umsøkjarar kanna, um dálkandi evni eru í tilfarinum, sum skal aftursøkkjast. Ávís evnir, nevnd í fylgiskjali, mugu bert finnast í smáum nøgdum í tilfarinum.

### Umsiting

Heilsufrøðiliga starvsstovan umsitur kunngerðina, men áðrenn loyvi verður givið til aftursøkking, skal umsóknin leggjast fyri Fiskimálastýrið, Landsverkfrøðingin og viðkomandi kommunu til ummælis.

Avgerðir tiknar eftir kunngerðini kunnu kærast til landsstýrismannin.

## Kunngerð um nýtslu og burturbeining av evnum og tilfari frá havstøðum, nr. 37 frá 8. mars 2001

### Virkisøki

Kunngerðin ásetur, at eingin nýtsla ella burturbeining av evnum og tilfari, sum stavar frá kolvetnisvirksemi, má fara fram uttan loyvi frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Loyvi verður veitt við grundarlagi í umsóknarupplýsingum frá feløgunum.

Kunngerðin heimilar Heilsufrøðiligu starvsstovuni at áleggja oljufeløgunum at gera kanningar o.l. tiltøk á sjóøkinum uttanum havstøðina.

**Umsiting**

Heilsufrøðiliga starvsstovan veitir loyvir og hevur eftirlitið sambært kunngerðini.

**Meting**

Víst verður til meting í sambandi við kunngerð um móttøkuskipanir í føroyskum havnum fyri leivdir og blandingar av skaðiligum flótandi evnum, ið verða flutt sum leysafarmur (í bulk), nr. 33 frá 8. mars 2001.

**Ábøtur**

Kunngerðin eigur at skrivast saman við kunngerð nr. 33 frá 8. mars 2001.

## Kunngerð um móttókuskipan av oljurestum og blandingum, kloakkavlopsvatni og burturkasti í føroyskum havnum, nr. 20 frá 8. apríl 1987

**Virkisøki**

Lógin ásetur, at føroyskar havnir skulu hava móttøkuskipanir til oljurestir, kloakkavlopsvatn og burturkast frá skipum og boripallum. Lógin ásetur somuleiðis, at í ávísum havnum skal vera atgongd til reinsiverk til sundurskiljing av vatn/oljublandingum.

Bunkringsfyritøkur, oljufeløg ella skipasmiðjur kunnu fáa boð um at seta egnu skipan í verk til móttøku av oljublandaðum barlastar- ella tangaskolivatni.

**Umsiting**

Havnarstýrini skulu syrgja fyri, at móttøkuskipanir verða settar í verk.

Vaktar og Bjargingartænastan hevur eftirlitið við, at ásetingarnar í lógini verða fylgdar. Vaktar- og Bjargingartænastan kann, eftir samráð við landsstýrið, geva boð til havnarstýrir ella fyritøkur, um ásetingarnar ikki verða fylgdar.

Avgerðir hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni kunnu kærast til umhvørvisnevnd.

## Kunngerð um fráboðan av upplýsingum um vandamikið ella dálkandi góðs umborð á skipum, nr. 32 frá 8. mars 2001

### Virkisøki

Kunngerðin ásetur, at skip mugu ikki flyta vandmikið góðs, fyrr enn sendarin hevur veitt ábyrgdarhavandi hjá skipinum frágreiðing um góðsið, í samsvar við altjóða fyrskipanir. Fyristøðufelagið hjá skipinum skal veita myndugleikunum upplýsingarnar í samsvar við fylgiskjal 1 í kunngerðini. Fylgiskjal 2 inniheldur upplýsingar, sum skipsførarin skal geva, áðrenn skipið kemur í føroyska havn. Upplýsingarnar skulu vera tøkar hjá myndugleikunum.

### Umsiting

Vaktar- og Bjargingartænastan skal hava upplýsingarnar.

## Kunngerð um umhvørvisgóðkenning av snarferjuleiðum, nr. 36 frá 8. mars 2001

### Virkisøki

Ásett er, at snarferjurleiðir skulu umhvørvisgóðkennast, áðrenn ein nýggj leið verður tikin í nýtslu ella broytt.

### Umsiting

Heilsufrøðiliga starvsstovan veitir góðkenning og hevur eftirlit við, at kunngerðin og treytir fyri góðkenning verða hildnar.

## Kunngerð um gjøld eftir havumhvørvislógini, nr. 31 frá 8. mars 2001

### Virkisøki

Ásett er, at almenn og privat feløg skulu rinda Heilsufrøðiligu starvsstovuni fyri útreiðslur, nýttar til góðkenningar- og eftirlitsuppgávur sambært havumhvørvisverndarlógini við kunngerðum.

### Umsiting

Heilsufrøðiliga starvsstovan fyriskipar uppkrevjing av gjøldum.

## Havumhvørviskunngerðir sum danski umhvørvismálaráðharrin er biðin um at seta í gildi fyri Føroyar

### Bekendtgørelse om anvendelse af oliejournal

Hendan kunngerð sigur, at øll tangaskip yvir 150 BRT og øll onnur skip yvir 400 BRT, eins og havstøðir skulu føra oljujournal.

### Bekendtgørelse om anvendelse af journal for skadelige flydende stoffer (lastjournal)

Hendan kunngerð krevur, at øll skip, sum føra skaðilig flótandi evni sum leysafarm, skulu føra ein rakstrarbók yvir hesi evni.

### Bekendtgørelse om påtegning af lastjournal for skibe, der transporterer skadelige flydende stoffer i bulk

Kunngerðin sigur, at Søfartsstyrelsen skal geva átekning, tá skaðilig flótandi evni verða lossað.

### Bekendtgørelse om udtømning af affald fra skibe m.v.

Kunngerðin setur nærri reglur fyri burturbeining av burturkasti frá skipum og havstøðum.

### Bekendtgørelse om udtømning af olie fra skibe

Kunngerðin setur treytir fyri útláti av olju og oljumiklum vatni frá skipum.

### Bekendtgørelse om udarbejdelse, indhold og godkendelse af skibsberedskabsplaner ved olieforurening

Kunngerðin sigur, at fyri øll oljutangaskip yvir 150 tons og øll onnur skip yvir 400 BRT skal gerast ein tilbúgvingarskipan móti oljudálking sambært leiðbeiningum frá IMO.

### Bekendtgørelse om førelse af affaldsjournal

Kunngerðin ásetur, at øll skip omanfyri 400 BRT og øll skip, sum eru góðkend til 15 ferðafólk ella fleiri, skulu føra burturkastjournal.

### Bekendtgørelse om klassifikation og kategorisering samt udtømning af flydende stoffer, der transporteres i bulk

Kunngerðin ásetur, at flótandi evni, sum ikki eru at finna í fylgiskjølunum til kunngerðina, skulu klassifiserast. Haraftrat eru reglur fyri útláti av ávísum evnum, sum eru nevnd í kunngerðini.

# NÁTTÚRUFRIÐINGARLÓGIN

## Løgtingslóg um náttúrufriðing, nr. 48 frá 9. juli 1970, sum broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 13. juni 1995

### Virkisøki

Lógin ásetur bann ímóti sjónligari dálking av ymiskum sløgum, har hetta misprýðir landslagið ella er til sjónligan ampa ella skaða fyri onnur. Lógin ásetur bann ímóti, at órudd verður lagt á stað, har hetta er til sjónligan ampa ella skaða fyri onnur.

Lógin ásetur, at friðingarnevnd skal góðkenna bygging uttangarðs og á ávísum støðum innangarðs. Somuleiðis skal friðingarnevnd góðkenna grótbrot og størri arbeiði, ið kunnu væntast at broyta sermerkt landslag ella náttúru.

Uttangarðs skulu friðingarnevndirnar, tvs. tann lokala friðingarnevndin og yvirfriðingarnevndin, góðkenna allan bygging, tó ikki kráir og ból.

Innangarðs skulu friðingarnevndirnar góðkenna allan bygging nærri enn

- 100 m frá bakkatromini
- 300 frá viðalundum
- 300 m frá vøtnum > 1ha
- og við áum > 4 m breiðar í botninum

Útilýsingar eru sambært lógini bert loyvdar í ávísum førum. Lýsingar eru sambært lógini bert loyvdar á ávísum støðum.

Byggisamtykir verða av siðvenju fyrilagdar friðingarnevndini.

Lógin heimilar friðing av økjum á landi, á vøtnum ella áum. Friðing kann fremjast orsakað av t.d. vísindaligum ella søguligum orsøkum, orsakað av vakurleika, plantugróðri, djóralívi ella sereyðkenni. Sí annars partin um lóg um býarskipan og byggisamtyktir.

### Umsiting

Lógin er ein partur av málsøkinum hjá Oljumálastýrinum**.** Lógin verður umsitin av einari friðingarnevnd í hvørjari sýslu. Sýslumaðurin er føddur formaður, meðan landsstýrismaðurin í umhvørvismálum velur hinar báðar limirnar fyri 6 ár í senn.

Avgerðir, sum friðingarnevndirnar taka, fara altíð til yvirfriðinganevndina, men kunnu annars kærast til yvirfriðingarnevndina. Limir í yvirfriðingarnevndini eru sorinskrivarin (formaður), stjórin á Fornminnissavninum, stjórin á Náttúrugripasavninum og tveir persónar, sum landsstýrið velur fyri 6 ár í senn.

Um ein avgerð hevur við sær, at tað almenna skal lata endurgjald, ið fer upp um kr. 500, er avgerðin ikki galdandi, fyrr enn landsstýrið hevur góðkent avgerðina.

Avgerðir hjá yvirfriðingarnevndini eru endaligar og kunnu ikki skjótast inn fyri dómstólarnar ella kærast til annan myndugleika.

**Meting**

Náttúrufriðingarlógin nøktar als ikki tann tørv, sum er á náttúrufyrisiting í dag. Friðingarnevndirnar og yvirfriðinganevndin eru virknar, men fáast mest við mál um órudd og góðkenning av bygging uttangarðs sum innangarðs. Nevndirnar fáa einki gjørt við ikki-dálkandi langtíðarvirkandi broytingar, sum t.d. landslagbroytingar, vatnorkubyrgingar og ikki sjónligar broytingar, sum t.d. oyðing av vøtnum.

Náttúruverndararbeiðið verður í okkara grannalondum í størri mun regulerað sambært altjóða sáttmálum, har politiski myndugleikin hevur ein avgerandi leiklut. Núverandi føroyska skipanin er fullkomiliga leys av politiska myndugleikanum. Friðingarnevndirnar arbeiða ikki eftir ynskjum ella málsetningum hjá landsstýrinum. Tó er tað so, at um kanningar, semjur, ella endurgjald kosta meira enn kr. 500, skal landsstýrið góðkenna avgerðina. Hetta hevur við sær, at týðandi avgerðir kunnu gerast politiskar.

Lógin er upprunaliga gjørd eftir tí donsku lógini og hóskar tí ofta illa til føroysk viðurskiftir. Lógin er eisini avoldað nú, aftaná at umhvørvislógin er komin í gildi, og eiga hesar lógirnar at samskipast. Lógin er somuleiðis rættiliga ógreið, og eru fleiri ásetingar eisini við í nýggjari kunngerðum, sosum í kunngerðini um umhvørvisreglur.

Lógin var í sínara tíð gjørd av einum sorinskrivara. Seinni, umleið 1976/77, sat ein nevnd og viðgjørdi lógina (sorinskrivarin, matrikulstjórin, landsverkfrøðingurin og ein frá landsstýrinum). Umleið 1992/93 sat somuleiðis ein nevnd, hesuferð við skógfútanum sum formanni, og gjørdi uppskot til nýggja náttúrufriðingalóg. Sostatt fyriliggja fleiri uppskot til eina nýggja lóg í arkivunum hjá landsstýrinum.

**Ábøtur**

Nýggj tíðarhóskandi náttúruverndarlóg eigur at verða smíðað, sum tekur støði í dagsins fyrisiting, og skal landsstýrismaðurin hava endaligu ábyrgdina. Ein slík lóg skal verja og regulera nýtsluna av villum djórum og plantum. Hetta skal tó ikki vera galdandi fyri fisk og havsúgdjór, sum verða umsitin av Fiskimálastýrinum.

Yvirfriðingarnevndin og friðingarnevndirnar eiga at verða umskipaðar til ráðgevandi nevndir hjá landsstýrismanninum. Náttúrueftirlit, tvs. eftirlit við friðaðum djórum, vøkstri og livistøðum eigur at verða lagt hjá einumhvørjum stovni, t.d. Náttúrugripasavninum.

Øll eiga at hava møguleika at leggja fram uppskot um friðing. Náttúrugripasavnið, Fornminnissavnið og friðingarnevndirnar eiga at viðgera uppskot um friðing og ráðgeva landsstýrismanninum eftir umbøn. Landsstýrismaðurin eigur síðan at taka endaliga avgerð um friðing, aftaná at uppskotið hevur verið lagt fram til almenna hoyring.

Viðmerkjast kann at vernd av gróti ikki er umfatað av nakrari lóg og at tørvur somuleiðis er á lóg, sum friðar ávísar plantur.

# ONNUR UMHVØRVIS- OG NÁTTÚRULÓGGÁVA

## Lov for Færøerne om bekæmpelse af smitsomme plantesygdomme og skadedyr, nr. 370 af 21. december 1938

### Virkisøki

Lógin heimilar ”Landbrugs- og Fiskeriministeren” at fremja neyðugar atgerðir fyri at tryggja sær, at skaðadýr og plantusjúkur ikki koma til Føroya ella spjaðast.

Endurgjald verður veitt eftir ávísum reglum, um neyðugt er at oyðileggja avgrøði.

### Umsiting

Lógin er ein partur av málsøkinum hjá Vinnumálastýrinum. Náttúrugripasavnið hevur fakkunnleikan innan økið, men har minnist eingin seg nakrantíð hava ummælt ella viðgjørt nakað mál sambært lógini.

### Meting

Lógin er ótíðarhóskandi. Í løtuni er einki virkið eftirlit við, hvørjar plantur ella dýr verða innflutt til Føroya, og sostatt heldur eingin meting av, hvønn skaða tey møguliga kunna gera á okkara upprunaliga vøkstur.

### Ábøtur

Lógin eigur at dagførast.

## Kunngerð um innflutning av djórum og smittuberandi lutum, nr. 55 frá 26. mai 1983, sum broytt við K. nr. 136 frá 5. november 1990 og K. nr. 30 frá 22. mars 1994 um broyting í kunngerð um innflutning av djórum og smittuberandi lutum

### Virkisøki

Kunngerðin ásetur, at allur innflutningur til Føroya av livandi súgdjórum og fuglum er forboðin, og at allur innflutningur av skriðdýrum og paddum er forboðin.

### Umsiting

Kunngerðin er ein partur av málsøkinum hjá Vinnumálastýrinum.

### Meting

Ivasamt er, um skriðdýr og paddur eru húsdýr ella kunnu skaða ”landbúnað, viðarlundir, fiskarí og aðrar vinnu”. Tí er ivasamt, um kunngerðin hevur heimild í lógini.

**Ábøtur**

Náttúrugripasavnið hevur roynt at forða fyri, at til dømis ferðafalkar vórðu innfluttir, smyrlar útfluttir osfv., men til fánýtis.

## M.B. om foranstaltninger mod kartoffelbrok, nr. 13 af 18. marts 1942

**Virkisøki**

MB sigur, hvussu farast skal fram fyri at avmarka smittuvandan, tá ið eitt øki er fongt við"kartoffelbrok". Sambært lógini eru øll øki í Sands bygd, Fámjin, Hvalba, Miðvági, Sandavági og partar av Vestmanna smittað við "kartoffelbrok" og sostatt umfatað av treytunum í lógini.

**Umsiting**

Vinnumálastýrið umsitur máløkið.

**Meting**

MB. er ótíðarhóskandi.

**Ábøtur**

MB. eigur at verða avtikin.

## Lov om midler til bekæmpelse af plantesygdomme m.m., nr. 73 af 23 marts 1932 som ændret ved lov nr. 447 af 22. december 1939

**Virkisøki**

Lógin snýr seg um evnir til niðurberjing av plantusjúkum, illgresi ella djórum, sum eru skaðilig fyri avgrøði innan landbúnað, havabrúk og skógbrúk.

Ásett er í lógini, at framleiðsla, innflutningur og útflutningur av evnum skal góðkennast av "Landbrugsministeren".

**Umsiting**

Vinnumálastýrið umsitur máløkið.

**Meting**

Lógin er ótíðarhóskandi.

**Ábøtur**

Lógin eigur at verða dagførd.

## Lov om foranstaltninger mod udbredelse af rustsvampe, nr. 55 af 27. marts 1903

### Virkisøki

Lógin snýr seg um avmarkandi tiltøk ímóti rustsvampi.

Ásett er, at ”Berberisbuske” bert mugu niðursetast í havum knýttir at undirvísingarstovnum og á avmarkaðum økjum, har mett verður, at hetta ikki kann skaða landsfíggjaráhugamál.

Lógin ásetur, at ”Berberisbuske” bert kunnu plantast við loyvi, og at einstøk onnur plantusløg kunnu burturbeinast frá ávísum økjum.

Lógin ásetur, at eigari av jarðarbrúki kann krevja burtur plantur av slagnum ”korsved” og Cypres-Vortemælk”, um hesar eru niðursettar innan fyri 300 alin frá grannamarki.

### Meting

Lógin er ótíðarhóskandi.

### Ábøtur

Lógin eigur av verða dagførd.

## Løgtingslóg um viðarlundir, nr.  53 frá 27. november 1952, sum seinast broytt við løgtinglóg nr. 110 frá 29. juni 1995

### Virkisøki

Lógin ásetur, at almennu viðarlundirnar eru friðaðar, og at ein 5 manna nevnd vald av landsstýrinum hevur eftirlitið við viðalundunum.

### Umsiting

Lógin er partur av málsøkinum hjá Vinnumálastýrinum. Skógrøkt landsins, sum er stovnur undir Vinnumálastýrinum, røkir uppgávurnar hjá nevndini.

### Meting

Viðarlundirnar hava rekreativan týdning fyri fólk. Tær gera landslagið meira fjøltáttað, økja um fugla- og plantumeingi og verja ímóti jørðoying.

Ein eigur tó at hava í huga, at viðarlundirnar í Føroyum er niðursettar. Her er ikki tørvur á vernd av upprunaligum vøkstri.

### Ábøtur

Tað hevði ríkað um okkara náttúru, um eitt øki ella ein oyggj var sett av til upprunatrævøkstur.

## Løgtingslóg um avmarking av nýtsluni av freon, nr. 126 frá 3. oktober 1988

### Virkisøki

Lógin heimilar landsstýrinum at áseta reglur um bann fyri nýtslu av freon.

### Umsiting

Lógin er partur av málsøkinum hjá landsstýrismanninum í umhvørvismálum.

### Meting

Eftir at landstýrið í 1987 setti í gildi Wien-sáttmálan um verju av ozonlagnum, var ætlanin, at nærri reglur skuldi setast í gildi fyri avmarking av nýtsluni av freon. Løgtinglóg nr. 126 frá 1988 gav landsstýrinum heimild til at gera slíkar reglur, men heimildin er ongantíð nýtt.

### Ábøtur

Tørvur er á kunngerðum, sum neyvari áseta avmarkingar í nýtsluni av freon.

## Løgtingslóg um bann móti burturkoyring av mold til sjós, nr. 77 frá 12. juli 1984

### Virkisøki

Lógin bannar burturbeining av mold, leiri og øðrum tilfari frá útgrevstri, vegagerð o.t. við at koyra tilfarið á sjógv.

### Umsiting

Kommunustýrir hava skyldu til at ávísa øki, har tilfar frá útgrevstri kann leggjast.

Landsstýrið kann áseta nærri reglur í kunngerð.

### Meting

Lógin er skilagóð. Hon forðar fyri spilli av einum náttúrligum tilfeingi, sum vit hava lítið av í landinum.

### Ábøtur

Ongar.

## Løgtinglóg um íløt til øl, miniralvatn og lidnar leskidrykkir, nr. 73 frá 10. mai 1994 sum broytt við lóg nr. 88 frá 4. juli 1996

**Virkisøki**

Lógin bannar innflutningi av øli, mineralvatni og lidnum leskidrykkjum í íløtum, sum bert verða nýtt eina ferð til upprunaliga endamálið. Undantikið er søla av drykkjum i pappíløtum uttan kolsýru.

**Umsiting**

Tollvaldið hevur praktiska eftirlitið við lógini, men kunngerðin er partur av málsøkinum hjá landsstýrismanninum í umhvørvismálum.

**Meting**

Tað er neyvan nakar ivi um, at pantskipanin og endurfylling av íløtum er ein umhvørvisvinarlig loysn. Hetta avmarkar sjónligu dálkingina og samlaðu burturkastnøgdina.

Innflutningur og søla av metal- og plastíløtum, sum ikki kunnu endurfyllast, men sum kunnu endurvinnast við smelting, er eisini ein møguleiki, sum verður nýttur nógva staðni. Hetta er møguliga ikki eins gott og endurfylling, men við eini pantskipan ber til at tryggja, at hesi íløt koma til høldar og verða endurvunnin.

Spurningurin er, um endurfyllingarskipanin í Føroyum dettur niðurfyri, um vit loyva innflutningi av eingangsíløtum. Um tað loysir seg betur at innflyta og framleiða drykkir í eingangsíløtum, enn í endurfyllingaríløtum, so verður hetta ivaleyst endaliga gongdin fyri allar úrdráttir. Tað hevði nokk verið ein umhvørvisliga vánaligari loysn enn, tann vit hava í dag.

Lógin inniheldur onga vegleiðing um, hvat er umfatað av orðingini ”leskidrykkir”. Tollarar meta seg ikki vera førar fyri at taka dagar ímillum leskidrykkir og aðrar drykkir, og kemur tí hópin av drykkjum inn í landið í eingangsíløtum.

**Ábøtur**

Tað er neyðugt við eini gjøllari meting av, um núveradi ásetingar hava umhvørvisligt hald, og hvussu lógin skal skiljast.

## Løgtingslóg um avgjald á smyrjiolju, nr. 75 frá 13. mai 1992

**Virkisøki**

Lógin ásetur, at ein og hvør, sum innflytur ella framleiðir smyrjiolju (tariff-nr. 27.10.00.81 og 27.10.00.89 í toll- og vøruskránni), skal rinda til landskassan kr. 1,00 fyri liturin.

Landsstýrinum er heimilað at fáa aðrar líknandi úrdráttir, sosum hydraulikk- og gearolju undir reglurnar í hesi lóg.

Landsstýrinum er heimilað at gera avtalu um innsavnan og viðgerð av spillolju, og um gjaldið fyri hetta.

**Umsiting**

Toll- og skattstova Føroya.

**Meting**

Sáttmáli er gjørdur millum Føroya landsstýri og IRF um innsavnan og viðgerð av spillolju, og verður spillolja innsavnað kring alt landið.

Spilloljan verður heintað frá skipun, havnum, bingjuplássum, bátahyljum og bilverkstøðum v.m. og reinsað á Spilloljuverkinum hjá IRF á Kambsdali. Reinsaða oljan verður nýtt til upphiting v.m.

**Ábøtur**

Samsvar er ikki millum avgjaldið á smyrjolju og innsavnan og viðgerð av spillolju, og eigur tí at verða umhugsað, um gjald skal leggjast á onnur tariff-nr. í toll- og vøruskránni, sosum tungolju.

## Kunngerð um bilvrakgrunn, nr. 104 frá 3. november 1989 við heimild í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum, nr. 102 frá 1. oktober 1986

**Virkisøki**

Kunngerðin er heimilað í løgtingslóg nr. 102, grein 13 frá 1. oktober 1986.

Løgtingslóg nr. 175 kom í gildi 1. januar 1993, samstundis sum løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 um skrásetingargjald á motorakførum fór úr gildi.

Grein 20 í lóg nr. 175 er soljóðandi: Gjald fyri burturbeining. Til burturbeining av teimum í grein 3, 4, 6, 7, 8, 10, 15, 17 og 18 nevndu akførum verður landsstýrinum heimilað at áseta eitt gjald, sum verður rindað í landskassan við fyrstu skráseting av akfarinum. Nærri reglur fyri útgjalding fyri burturbeining av akførum verða ásettar av Føroya landsstýri.

**Umsitingarmynduleiki**

Føroya landsstýri, Toll og skattastova Føroya og Heilsufrøðiliga starvsstovan.

**Meting**

IRF og Kommunala brennistøðin hjá Tórshavnar kommunu eru einastu góðkendu móttøkustøðini av bilvrakum, og feløgini samstarva um at senda bilvrakini av landinum til endurnýtslu.

Skipanin virkar væl, men svarar gjaldið fyri burturbeiningina ikki til flutningsútreiðslurnar, viðgerðina v.m.

Ivasamt er, um kunngerð 121 frá 20. juni er í gildi, av tí at hon vísir til løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986, sum fór úr gildi fýra ár, áðrenn kunngerðin bleiv lýst.

**Ábøtur**

Kunngerð nr. 104 eigur at tillagast løgtingslóg nr. 175 frá 18. desember 1992.

Heimildargrundarlagið fyri kunngerð nr. 121 eigur at fáast í rættlag.

Tað eigur at verða umhugsað, um kunngerðin eisini skal umfata frystiboksir og køliskáp.

Grein 12, 14 og 17 í kunngerð nr. 135, um broyting í kunngerð um bilvrakgrunn frá 2. november 1990, verða broyttar.

Kunngerð nr. 121, kunngerð um broyting í kunngerð um bilvrakgrunn. Grein 6, 7 og 15 verða broyttar.

# LÓGGÁVA UM VØTN, VATNVEITING OG VATNBURTURVEITING

## Lov for Færøerne om benyttelse af indsøer og vandløb, nr. 169 af 18. maj 1937 som ændret ved L. nr. 92 af 23. februar 1988

### Virkisøki

Lógin ásetur, hvør hevur nýtslurættin til vøtn og áir, og hvussu skal farast fram á grannastevnu, hagastevnu ella búnaðarastevnu, tá ið viðtøka skal gerast í málum, sum viðvíkja nýtslu av vøtnum og áum, og hvussu farast skal fram, tá ið talan er um at veita vatn til og frá lendi, og nær vatnskoðararnir skulu nýtast sum metingarmenn.

Eftir hesi lóg hevur landsstýrið heimild til at veita loyvi at nýta vatnið til t.d. orkuframleiðslu.

### Umsitingarmyndugleiki

Lógin er ein partur av málsøkinum hjá Vinnumálastýrinum.

Avgerðir og metingar sambært lógini verða gjørdar av vatnskoðarum, og er mannagongdin fyri málviðgerðini ásett í sokallaðu garðalógini.

### Meting og ábøtur

Lógini tørvar eina grein um, at tað kann fiskast til vísindalig endamál.

Í sambandi við nýtslu av áum og vøtnum eigur at ansast eftir, at vatnið støðugt er ført fyri at varðveita sítt lívfrøðiliga margfaldni.

Aðrar týðandi lógir í hesum sambandi:

- Lov for Færøerne om vandledninger (1/4/1909)
- Lov for Færøerne om Haugers Styrelse og Drift m.m. (18/5-1937)
- Lov for Færøerne om Hegn og Markfred (18/5-1937)
- Lov for Færøerne om Grandestævne m.m. (18/5-1937)
- Fiskerilov for Færøerne (14/4-1893), ið má vera endurnýggjað í K. nr. 92 frá 26. juni 1990 um síla- og laksaveiðu

## Lov om beskyttelse af vandforsyningsanlæg, nr. 60 af 24. april 1896, sum broytt við lov nr. 127 frá 15. apríl 1930

### Virkisøki

Lógin hevur 4 ásetingar, sum skulu tryggja drekkivatn í Keypmannahavn ímóti útleiðing av spillvatni.

**Umsitingarmyndugleiki**

Ógreitt, men helst Vinnumálastýrið.

**Meting**

Lógin er ótíðarhóskandi og óneyðug. Vatnveitingarlendi verður tryggjað sambært umhvørvisverndarlógini. Somuleiðis ásetur umhvørvisverndarlógin treytir fyri útleiðing av spillvatni.

**Ábøtur**

Lógin eigur av verða avtikin.

## Lov om tilvejebringelse af vedtægt for benyttelse af vand fra Tórshavns vandværk, nr. 48 af 24 marts 1899

**Virkisøki**

Lógin ásetur, at Tórshavnar kommuna kann gera eina reglugerð fyri at avmarka óneyðuga nýtslu og spill av vatni í kommununi. Reglugerðin skal innihalda líknandi ásetingar sum tær, sum galda fyri Keypmannahavn sambært eini lóg frá 1857. Áðrenn reglugerðin verður galdandi, skal hon staðfestast av ”justitsministeren”.

**Umsiting**

Ógreitt, men seinasta reglugerðin varð staðfest av landsstýrismanninum í umhvørvismálum.

**Meting**

Lógin er ótíðarhóskandi. Tó er tað neyðugt við lóggávu á økinum soleiðis, at kommunur kunnu gera neyðugar ásetingar fyri vatnveitingarøkið. Krøvini til reinskan av vatni gerast alt størri og hava útreiðslur við sær fyri kommunurnar. Tí er tað ynskiligt hjá kommunum, at borgarin ikki nýtir meira vatn enn neyðugt.

**Ábøtur**

Nýggj tíðarhóskandi lóg má smíðast.

## Lov for Færøerne om vandledninger, nr. 63 af 1. april 1909

**Virkisøki**

Lógin áleggur fastognarfólki at lata øki og vatn frá sær, har hetta kann verða samfelagnum til góðar. Neyðugt kann eisini vera hjá fastognarfólki at lata lendi frá sær, ella skerja um nýtsluna av lendinum, fyri at tryggja vatnveitingarøkið ímóti dálking. Endurgjald skal latast fyri møguligt tap.

Lógin heimilar bygdakommununum at gera líknandi reglugerð fyri vatnveiting, sum Tórshavnar kommuna hevur heimild til sambært ”Lov om tilvejebringelse af vedtægt for benyttelse af vand fra Tórshavns vandværk, nr. 48 af 24 marts 1899”.

**Umsiting**

Ógreitt.

**Meting**

Lógin er ótíðarhóskandi. Partar av henni umskara ásetingar í umhvørvisverndarlógini.

**Ábøtur**

Nýggja tíðarhóskandi lóg má smíðast.

# LÓGGÁVA UM BYGGI- OG BÝARSKIPAN

## Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, nr.13 frá 21.05.1954

### Virkisøki

Lógin heimilar kommununum at gera býarskipan fyri kommununa ella ein part av henni. Í eini býarskipan skal vera greitt frá byggi-, vega- og havnarviðurskiftum nú og í framtíðini.

Innan eitt ár eftir at ein býarskipan er gjørd, skal kommunan gera eina byggisamtykt fyri tað øki, sum býarskipanin fevnir um. Ein byggisamtykt skuldi verið ein nærri útgreining av býarskipanini, men í verki eru tær oftast eins. Kommunan ger eina byggisamtykt, sum vanliga kallast býarskipan og byggisamtykt.

Tað ber til at gera eina byggisamtykt uttan at hava eina býarskipan, men hevur kommunan gjørt eina býarskipan, so skal hon gera eina byggisamtykt innan fyri eitt ár. Ein byggisamtykt skal innihalda ásetingar um:

- Byggivaldið

Kommunan skal í byggisamtyktini greiða frá, hvør ið hevur byggivaldið, og hvørjar revsimøguleikar byggivaldið hevur.

- Byggiøki

Kommunan skal í byggisamtyktini greiða frá, hvussu:

  - núverandi øki verður brúkt
  - ætlanin er at byggja út í kommununi
  - vegakervið skal vera
  - frárensl og veitingar skulu vera
  - tað skal vera bygt, tilfar og frástøða millum húsini og byggilinjur til veg.

- Opin øki

Kommunan skal ikki bara gera eina ætlan fyri, hvar tað skal vera bygt, men eisini fyri, hvussu tey opnu økini millum húsini skulu vera. Hetta eru øki ætlað til almenna ferðslu, spæliplláss og annað.

- Varðveitan

Kommunan kann avgera at varðveita eitt øki við ávísum eyðkennum, uttan at tað kemur undir friðing. Á sama hátt, sum tað ber til at gera ásetingar um eina nýggja bygging, so ber eisini til at gera ásetingar um at varðveita ein ávísan byggihátt í kommununi. Kommunan kann eisini avgera at lata eitt ávíst lendi, t.d. traðir,  liggja til sama brúk sum nú, uttan at talan er um friðing.

Lógin nevnir ikki friðing, fríøki ella frílendi, og er ikki ein friðingarlóg, men ein lóg um, hvussu byggingin í kommununi skal regulerast, bæði mótvegis verandi bygging og mótvegis tí óbygda lendinum.

Lógin verður ofta sæð sum ein ognartøkulóg, tí tað sambært grein 12 í lógini ber til at ognartaka, ikki bara øki til vegir, skúlar, lendingar, kirkjugarðar og annað, sum vanliga verður hildið at gagna tí almennu vælferðini, men eisini til grundstykkir.

Kommunan kann eisini blíva tvungin til at ognartaka eina ogn, sum vegna eina byggisamtykt gerst virðisleys fyri eigaran. Um kommunan við at varðveita eitt øki veruliga skerjir nýtslumøguleikarnar í mun til umliggjandi ognir, kann eigarin krevja, at kommunan tekur ognina móti endurgjaldi. Hvørt tað sama er galdandi fyri varðveitan av eldri býarpørtum er ivasamt.

**Umsiting**

Landsstýrismaðurin í kommunumálum hevur góðkenningarmyndugleikan yvir kommunalum býarskipanum. Landsstýrið hevur sett eina býarskipanarnevnd at standa fyri hesum góðkenningum, herundir broytingum í býarskipanum. Kommunurnar hava skyldu at fylgja einari góðkendari býarskipan.

Tá talan er um byggilinjur fram við vegum, er tað landsstýrið, sum er beinleiðis byggimyndugleiki. Sambært grein 6 og 7 í býarskipanarlógini kann landstýrið gera uppskot um byggilinjur fram við landsvegi, men siðvenjan hevur verið, at Landsverkfrøðingurin sambært grein 6 og 7 í landsvegalógini er farin inn sum byggimyndugleiki.

**Metingar**

Hóast danski teksturin í býarskipanarlógini vísir til eina byggilóg, so er eingin slík í gildi í Føroyum. Tað er eingin lóg, sum staðfestir byggimyndugleikan, ella hvat kemur undir bygging. Tann myndugleika, sum kommunan hevur, hevur hon við heimild í gomlu kommunulógini frá 1872 og frá eini plakat um ”bygnings- og brandvæsenet i de færøske landkommuner” frá 1881.

Allar tær stóru almennu útbyggingarnar, so sum landsvegir og annað, eru stórt sæð gjørdar uttan byggiloyvi, hóast hetta eru tiltøk, sum hava nógv meira ávirkan enn eini sethús. Tað er ikki nakað í lóggávuni, sum staðfestir hetta sum bygging. Eisini er lógin ófullfíggjað á øðrum økjum, t.d. um ein byggir eini 6 m høg hús, so krevst byggiloyvi, men til ber at leggja ein 6 m høgan moldbakka ella byggja eins høgan múr móti grannanum uttan byggiloyvi.

Ístaðin fyri at verða beinleiðis byggimyndugleiki fyri byggilinjur, kundi landsstýrið gjørt vart við síni áhugamál á sama hátt sum aðrir interessentar í sambandi við gerð av býarskipan og byggisamtyktum. Um kommunan ikki vil fylgja áhugamálunum hjá landstýrinum, kann landstýrið áleggja kommununi at áseta byggilinjur.

Hóast landsstýrið sum eftirlitsmyndugleiki alla tíðina frá 1948 hevur havt møguleika fyri at áleggja kommunum at gera ávís tiltøk, bæði viðvíkjandi planlegging og á øðrum økjum, so sær tað yvirhøvur út til, at tað er lættari at taka myndugleikan frá kommununum enn at áleggja kommununum at taka ávísar avgerðir.

Tær lógirnar, sum fyrst og fremst hava við býarskipanarlógina at gera, eru náttúrufriðingarlógin og landsvegalógin. Her hevur løgtingið sett tveir aðrar byggimyndugleikar inn javnbjóðis kommununa. Ein borgari, sum hevur fingið byggiloyvi frá kommununi, kann soleiðis verða steðgaður av einum

øðrum myndugleika, ikki tí tað er nakað galið við byggiloyvinum, men tí at annar myndugleiki ikki er hoyrdur í málinum.

Náttúrufriðingarlógin
Innan náttúrufriðingalógina virka friðingarnevndirnar og yvirfriðingarnevndin sum eitt slag av byggimyndugleika við síðuna av kommunustýrinum. Ein kommuna, sum hevur stórt byggilendi liggjandi í teimum økjum, sum koma undir náttúrufriðing sambært náttúrufriðingarlógini, skal leggja hvørt einasta mál fyri yvirfriðingarnevndina. Tað er møguleiki fyri at fáa eina byggisamtykt góðkenda av yvirfriðingarnevndini soleiðis, at kommunan ikki nýtist at leggja hvørt mál fyri friðingarmyndugleikarnar, men hetta verður ikki gjørt.

Landsvegalógin
Kommunurnar eru í nøkulunda somu støðu viðvíkjandi bygging fram við landsvegnum sum innan náttúrufriðingalógina. Hóast landsstýrið sambært býarskipanarlógina kann lýsa byggilinjur fram við vegum, sum hava týdning fyri almennu ferðsluna, so verður hetta ikki gjørt. Hinvegin ger landsvegalógin, at Landsverkfrøðingin viðger hvørt einstakt byggimál.

Skógfriðingalógin
Nakað tað sama ger seg galdandi viðvíkjandi skógfriðingarlógini. Í hesum føri viðger skógfriðingarnevndin hvørt einstakt mál.

Fornminnislógin
Jarðføst fornminni eru undir øllum umstøðum friðað, so har er støðan eitt sindur øðrvísi. Tað ber einans til at planleggja fyri tey fornminni, sum longu eru funnin ella eru væntandi.

Vatnveiting
Kommunan kann uttan eina byggisamtykt fáa sær vatnsavningarøki og vatnleiðingar.

**Ábøtur**

Mælt verður til, at ein byggilóg og ein kommunuplanlóg verða settar í gildi fyri Føroyar, og at onnur lóggáva verður tillagað kommunuplanlógini.

Endamálið við eini kommunuplanlóg er, at kommustýrið yvirfyri borgarunum avger, hvussu lendið skal nýtast. Borgararnir skulu hava møguleika at gera sína ávirkan galdandi viðvíkjandi planleggingini. Hetta kann eisini galda fyri borgarar, sum búgva í øðrum kommunum, men eiga ognir í avvarðandi kommunu.

Ætlanirnar eiga at vera býttar upp í høvuðsplanir, sum ikki eru ógvuliga útgreinaðar, men fyrst og fremst siga, hvar ætlanin er at hava tær ymisku funktiónirnar. Ein høvuðsplanur eigur at vera góðkendur av landsmyndugleikunum. Høvuðsplanurin skal fevna um alla kommununa, eisini t.d. hagan.

Økisætlan ella býlingssamtyktir eru fyri eitt avmarkað øki av kommununi. T.d. eina nýggja útstykking ella varðveiting av einum eldri býlingi. Um kommunustýrið ger eina býlingssamtykt og borgarin ella aðrir myndugleikar ikki mótmæla samtyktini, so kann hon setast í verk uttan aðra góðkenning.

Tørvur er samstundis á eini byggilóg, sum greinar, hvat kemur undir bygging, lendisregulering og annars setur almenn krøv til bygging.

# LÓGGÁVA UM HVAL, KÓP, FUGL OG HARU

## Løgtingslóg um hvalaveiðu, nr. 57 frá 5. juni 1984, sum broytt við Ll. nr. 41 frá 2. mai 1986, sum broytt við Ll. nr. 92 frá 13. juni 1995, og sum seinast broytt við Ll. nr. 54 frá 20. mai 1996

### Virkisøki

Lógin ásetur, at allur hvalur er friðaður, at landstýrið kann veita undantaksloyvi til hvalaveiðu og avgera, hvør kann veiða. Fleiri kunngerðir eru knýttar at lógini um hvalaveiðu, og eru tær nevndar niðanfyri.

### Umsiting

Lógin er partur av málsøkinum hjá Fiskimálastýrinum.

### Meting

Allur hvalur eru friðaður. Hvalaveiða av øllum sløgum fer tískil fram við undantaksloyvi. Hetta ger lógina lætta at fyrisita. Lógin er yvirhøvur ílagi.

## Kunngerð um undantak fyri friðing av hvali, nr. 19 frá 1. mars 1996

### Virkisøki

Kunngerðin ásetur, at loyvt er at skjóta nísu og at taka grindahval, hvessing, kjafthvítan springara og skjórutan springara.

### Umsiting

Kunngerðin er partur av málsøkinum hjá Fiskimálastýrinum.

### Meting

Kunngerðin loyvir ikki veiðu av døglingi, men slík veiða er farin fram uttan átalu.

### Ábøtur

Tað verður mett at hava týdning, at samsvar er ímillum lóg og veruleika innan hvalaveiðu.

## Kunngerð nr. 46 frá 8. apríl 1998 um grind

### Virkisøki

Kunngerðin ásetur allar reglur fyri grindadráp, reiðskap, uppfisking, skifti osfv.

### Umsiting

Kunngerðin er partur av málsøkinum hjá Fiskimálastýrinum. Sýslumenn, grindaformenn, bátsformenn og kommunustýrir hava tó praktisku fyrisitingina av kunngerðini.

### Meting

Kunngerðin virkar eftir ætlanini. Hon verður javnan endurskoðað.

## Ll. um fuglaveiðu v.m., nr. 27 frá 9. september 1954, broytt við Ll. nr. 11 frá 24. februar 1989

### Virkisøki

Lógin ásetur, hvørji fuglasløg kann veiðast, hvar og av hvørjum.

### Umsitingarmyndugleiki

Lógin er ein partur av málsøkinum hjá Vinnumálastýrinum.

### Meting

Loyvt er at veiða, um bert tú hevur danskan heimarætt og hevur fingið loyvi frá grundeigaranum. Hetta kann elva til trupulleika, um tú vilt geva fremmandum gestum loyvi til t.d. at fleyga lundar. Einki er kravt um kunnleika til veiðu ella djór.

Allur fuglur eigur at verða friðaður í bútíðini, meðan teir hava egg og ungar, eins og vanligt er aðrastaðni. Veiðitekin við veiðiroyndum og kunnleika til fuglalívið eigur at krevjast. Føroyar man í dag vera einasta norðurland, har veiðitekin ikki er krav. Veiðitekin virkar t.d. í Íslandi og Grønlandi.

### Ábøtur

Hendan lóg eigur av álvara at takast framaftur og gerast tíðarhóskandi. Eitt uppskot fyriliggur frá 1987, men hetta fall á tingi. Í 1992 varð gjørt eitt uppskot til eina rammulóg við eftirfylgjandi kunngerðum, men uppskotið fall eisini.

Ansast má eftir, at hótt fuglasløg verða vard, og at fjølbroytni í náttúruni verður varðveitt.

## Kunngerð um ræning av lomvigaeggjum, nr. 60 frá 16. mai 1986

Kunngerðin ásetur, at Náttúrugripasavnið skal veita loyvi til ræning, tó við kærumøguleika til Vinnumálastýrið. Kunngerðin virkar skjótt og væl. Náttúrugripasavnið tekur avgerð í samráð við fuglafrøðingin hjá Fiskirannsóknarstovuni.

## Kunngerð um serliga fuglaveiðu, nr. 120 frá 21. november 1986

Kunngerðin ásetur, at Náttúrugripasavnið veitur loyvi til at draga lundar, tó við kæramøguleika til Vinnumálastýrið. Kunngerðin gevur eisini Náttúrugripasavninum heimild at geva undantaksloyvi frá lóg um fuglaveiðu v.m., nr. 27 frá 1954. Kunngerðin virkar skjótt og væl, og gevur hon møguleika fyri vísindaligari veiðu.

## Lov om Ødelæggelse af Ravnens Yngel på Færøerne, nr. 34 af 11. marts 1892, som senest ændret ved L. nr. 92 af 23. februar 1988

### Virkisøki

Sambært hesi lóg og lóg um fuglaveiðu v.m., nr. 27 frá 1954, er ravnurin ongantíð friðaður, heldur ikki í bútíðini.

### Umsiting

Lógin er partur av málsøkinum hjá Vinnumálastýrinum.

### Meting

Hendan lóg verður ikki brúkt í dag. Prinsippið um friðing í bútíðini eigur eisini at umfata ravn. Lógin eigur at avtakast og leggjast inn í eina nýggja fuglaveiðulóg.

Ansast skal eftir, at fjølbroytni í náttúruni verður varðveitt.

## Løgtingslóg um haruveiðu, nr. 128 frá 25. oktober 1988

### Virkisøki

Hendan lóg fastsetur veiðitíðina fyri haru.

### Umsitingarmyndugleiki

Lógin er ein partur av málsøkinum hjá Vinnumálastýrinum.

### Meting

Lógin virkar væl, men kanska var tað meira hóskandi at havt eina almenna veiðulóg, ið umfatar alla veiðu, fugl sum haru, og kanska enntá eisini kóp og hval.

Haran bleiv upprunaliga innflutt í august 1854. Hon økir um fjølltátni í náttúruni, og somuleiðis hevur hon týdning fyri rekreativu lívskorini hjá menniskjum.

# ALTJÓÐA OG MILLUMTJÓÐA SÁTTMÁLAR

Arbeiðsbólkurn má staðfesta, at á hesum øki hevur ikki borið til at givið eina fulla lýsing í mun til arbeiðssetningin. Yvirlitið hevur teir týdningarmestu sáttmálarnar við, men lýsingin av teimum er neyvan fullfíggja. Frágreiðingin vantar eina raðfesting av, hvørjir sáttmálar eru av týdningi at Føroyar vera ein virkin partur í. Eisini vantar ein gjøllari útgreinan av altjóða rákinum og støðu Føroya.

## Convention on the prevention of marine pollution by dumping of waste and other matter (London Convention 1972)

### Endamál

At steðga óavmarkaðari søkking av burturkasti til havs. Sáttmálin setur bann fyri søkking av ávísum burturkasti (Annex 1/black list) og krevur serstakt loyvi fyri søkking av øðrum (Annex 2/grey list). Annað burturkast kann søkkjast eftir vanligari góðkenning (Annex 3).

Partar í sáttmálanum skulu m.a. syrgja fyri virknum eftirliti av øllum keldum til dálking av havinum og taka stig til at steðga søkking av burturkasti. Eftirlit og loyvisveitan skal leggjast hjá kompetentum stovni, sum gevur frágreiðing til IMO. Heimasíða: **www.imo.org**.

Í 1996 varð ein protokol undirskrivað í London. Protokollin setur harðari treytir fyri søkking av burturkasti. Søkking av øllum burturkasti uttan tí, sum er listað í annex 1 til protokollina, verður bannað. Burturkast, nevnt í annex 1, kann søkkjast, um treytirnar í annex 2, um meting á havumhvørvi, eru fylgdar.

Protokollin er ikki farin at virka enn.

### Støða Føroya

Sáttmálin hevur fingið gildi fyri Føroyar. Danmark hevur sett protokollina í gildi, men hevur tikið fyrivarni fyri Føroyum.

Tað má metast at hava stóran týdning fyri eina fiskivinnutjóð sum Føroyar, at havið verður tryggjað mest møguligt ímóti dálking. Ein og hvør herðing av treytunum fyri søkking av burturkasti á havinum er ein fyrimunur fyri okkum, og eiga vit tí ikki at vera eftirbátur, tá ið talan er um at seta havumhvørvisverndarsáttmálar í gildi og fylgja teimum upp.

## Convention on the prevention of pollution from ships (Marpol 1973)

### Endamál

At steðga dálking av havinum við olju, kemikalium og øðrum skaðiligum evnum, sum verða útleidd í sambandi við virksemi. At minka um mongdina av olju, sum vandi er fyri verður leidd út í náttúruna, um skip stoyta saman ella sigla uppá turt. Hetta er eisini galdandi fyri oljupallar. Sáttmálin herðir um verndina og eftirliti við havdálking frá skipum og serstakliga oljutangaskipum.

Í 1978 varð protokoll til sáttmálan undirskrivað í Londan. Protokollin hevði við sær enn harðari treytir. Protokollin tók sáttmálan soleiðis upp, at partar, t.v.s. lond, seta bæði sáttmála og protokoll í gildi, tá ið tikið verður undir við protokollini.

Síðan 1984 er fleiri broytingar framdar fyri at minka um dálkingina frá serstakliga nýggjum skipum og fyri at minka um dálkingina frá vanlukkum. Eisini var í 1997 enn ein protokoll knýtt at sáttmálanum.

IMO umsitur sáttmálan. Heimasíða: www.imo.org.

### Støða Føroya

Sáttmálin frá 1973 bleiv ongantíð settur í gildi í Føroyum, men í 1984 avgjørdi løgtingið at seta protokollina frá 1978 í gildi, og harvið gjørdist sjálvur sáttmálin eisini galdandi fyri Føroyar. Protokollin frá 1997 er ikki sett í gildi í Føroyum.

## Convention for the protection of the marine environment of the North-East Atlantic (OSPAR)

### Endamál

At fremja tær fyriskipanir, sum eru møguligar, til tess at fyribyrgja og vinna á dálking av havinum. Fyri at varðveita heilsuna hjá fólki og vistskipanirnar í havinum, hevur sáttmálin harumframt til endamáls at fremja neyðugar fyriskipanir til tess at verja havumhvørvið móti skaðaárinum, sum kunnu standast av mannaávum.

OSPAR er ein samanseting av pørtunum í fyrrverandi Oslo sáttmálanum og París sáttmálanum.

OSPAR sáttmálin inniheldur rættiliga ítøkuligar ásetingar, sum t.d. bann fyri nýtslu av ávísum evnum og ávísari tøkni.

Sáttmálin hevur 5 fylgiskjøl, sum snúgva seg um dálking av havinum frá keldum á landi, um dálking frá søkkjan ella brenning til sjós, um dálking frá frálanda keldu, um meting av havumhvørvinum og um vernd av vistskipanum og lívfrøðiligum fjølbroytni í havinum.

Sáttmálin verður umsitin av OSPAR skrivstovuni í London. Heimasíða: www.ospar.org.

### Støða Føroya

Sáttmálin og 4 av fylgiskjølunum eru galdandi fyri Føroyar.

## UN/ECE Convention on Long-Range Transboundary Air Pollution (Geneva 1979)

### Endamál

Sáttmálin er fingin í lag fyri at loysa trupulleikan av luftbornari dálking, sum fer um landamørk. Endamálið er at tryggja fólkaheilsuna og umhvørvið ímóti luftdálking. Sáttmálin skal í størst møguligan mun minka um og steðga luftdálking.

Sáttmálin er útbygdur við 8 protokollum, sum snúgva seg um serstøk evnir. Seinastu protokollirnar snúgva seg um tey sokallaðu POP'ini og tungmetal. Føroya løgting tók undir við hesi protokoll í seinastu tingsetu.

Sáttmálin verður umsitin av skrivstovuni hjá UN/ECE í Geneve. Heimasíða: www.emep.int.

### Støða Føroya

Sáttmálin og allar protokollirnar galda fyri Føroyar.

## Convention on the Protection of the Ozone Layer (Vienna 1985)

### Endamál

Sáttmálin skal tryggja fólkaheilsuna og umhvørvið ímóti vandanum av minkingini av ozonlagnum orsakað av menniskjaligum virksemi. Sáttmálin skal arbeiða fyri at banna øll evni, sum elva til minking av ozonlagnum. Hetta skal gerast við vísindaligari gransking, men við atliti til tørvin hjá menningarlondum.

Sáttmálin er útbygdur við Montreal protokollini, umframt London- og Keypmannahavnar-tillagingini.

Sáttmálin hevur skrivstovu í Nairobi, meðan protokollin hevur skrivstovu í Montreal. Heimasíður: www.unep.org/ozone, www.unep.ch/ozone og www.unmfs.org.

### Støða Føroya

Sáttmálin og Montreal protokollin eru galdandi fyri Føroyar.

## UN's Framework Convention on Climate Change (Rio 1992)

### Endamál

Sáttmálin skal arbeiða fyri at fáa heimsins útleiðingar av vakstrarhúsgassum niður á eitt støði, sum ikki hevur vandamikla ávirkan á heimsins veðurlagsskipan við sær. Sambært sáttmálanum skulu partarnir gera uppgerðir yvir sínar útleiðingar og meta um árinini á veðurlagsskipanina, tá ið tey leggja ætlanir fyri orku, landbúnað osfr.

Í 1997 varð Kyoto protokollin løgd aftrat sáttmálanum. Protokollin bindir ávís lond til at skerja útleiðingarnar av vakstrarhúsgassum við samanlagt 5%, sammett við samlaðu útleiðingina í 1990.

Skrivstovan hjá veðurlagssáttmálanum hevur heimstað í Bonn. Heimasíða: www.unfccc.de.

### Støða Føroya

Sáttmálin um veðurlagsbroytingar er galdandi fyri Føroyar.

Boðað varð tann 29.03.01 donsku stjórnini frá, at Føroya landsstýri tekur ikki undir við, at Kyoto protokollin verður settur í gildi fyri Føroyar. Í uppritinum hesum viðvíkjandi varð m.a. sagt:

"Vísandi til, at veðurlagsbroytingar kunnu hava alstóran týdning fyri Føroyar sum land, ið er serliga bundið av havinum, eiga okkara verandi bindingar til meginreglur og tær ásettu frágreiðingarnar um útleiðingar av vakstrarhúsgassum sambært rammusáttmálanum um veðurlagsbroytingar frá 1992 at verða viðgjørdar í størsta álvara. Harafturat eigur, sum skjótast, at verða gjølla kannað, hvørjir møguleikar eru hjá Føroyum at gerast partur í Kyoto bindingunum, og harvið vísa okkara felagsábyrgd fyri umhvørvisvernd, treytað av, at hetta ikki á nakran hátt verður forðandi fyri framtíðar menning av oljuvinnu á føroyskum øki."

## Convention on the Control of Transboundary Movements of Hazardous Wastes (Basel 1989)

### Endamál

Sáttmálin skal skipa fyri eftirliti við og minka um flutningin av vandamiklum burturkasti um landmørk. Hetta er serstakliga galdandi fyri flutning av burturkasti frá ídnaðarlondum til menningarlond. Sáttmálin virkar fyri, at burturkast í mest møguligan mun verður viðgjørt har, ið tað er framleitt.

Ein tillaging varð gjørd í sáttmálanum í Geneve í 1995. Tillagingin ásetur ymisk krøv um beinleiðis bann av flutningi av vandamiklum burturkasti.

Sáttmálin hevur skrivstovu í Basel. Heimasíða: www.unep.ch/basel.

### Støða Føroya

Sáttmálin er ikki galdandi fyri Føroyar.

## Convention on Oil Pollution Preparedness, Response and Cooperation (London 1990)

### Endamál

Sáttmálin skal forða fyri vanlukkum á sjónum, sum kunnu føra við sær oljudálkan. Hetta skal fremjast við nýtslu av "forsigtighedsprincippet", og við ígildisetan av SOLAS og MARPOL sáttmálunum.

Sáttmálin skundar undir uppbyggingina av tilbúgvingarætlanum fyri oljudálking av havinum. Eisini leggur sáttmálin dent á samstarv og stuðul millum lond, tá ið vanlukkur henda.

Sáttmálin hevur eitt fylgisskjal, sum inniheldur reglur fyri kostnaðin av stuðli millum lond í sambandi við oljudálkan.

Skrivstovan er hjá IMO. Heimasíða: www.imo.org.

### Støða Føroya

Sáttmálin hevur verið til ummælis í øllum avvarðandi stýrum – uppskot til samtykar verður fyrireikað á Løgmanskrivstovuni, og málið verður helst lagt fyri tingið á heysti 2002.

## UN/ECE Convention on Environmental Impact Assessment in a Transboundary Context (Espoo, 1991)

### Endamál

Sáttmálin snýr seg um skaðaárin tvørtur um landamørk á umhvørvið. Ásett er í sáttmálanum, at lóggávan hjá teimum einstøku londunum skal tryggja, at skjalprógvað meting verður framd av virksemi, sum er nevnt í fylgiskjali 1 til sáttmálan, og sum kann hugsast at hava skaðiligt árin tvørtur um landamørk á umhvørvið.

Slík meting skal gerast, meðan virksemið enn er á verkætlanarstøði, og grannalond skulu kunnast um hetta. Tá ið metingin er gjørd, skal landið, sum dálkar, og grannalond, sum verða dálkað, samráðast um tiltøk. Úrslitið av samráðingunum skal takast við, tá ið avgerð verður tikin, um virksemið skal verða loyvt.

Fylgiskjal 1 listar 17 ymisk virksemi, so sum orkuverk, vegagerð, evnafrøðiligur ídnaður, olju-og gassleiðingar, stálframleiðslu osfr.

Fylgiskjal 2 ásetur, hvussu tann skjalprógvaða metingin skal fara fram.

Fylgiskjal 3 loyvir londum at víðka sáttmálan til onnur tiltøk enn tey 17, sum eru nevnd í fylgiskjali 1.

Sáttmálin hevur skrivstovu í Geneve. Heimasíður: www.unece.org/env/eia_h.ttm og www.mos.gov.pl/enimpas.

### Støða Føroya

Føroyar settu sáttmálan í gildi í 1994. Landsstýrið metti, at ásetingarnar kundu lúkast innanfyri karmarnar av galdandi lóg um umhvørvisvernd.

## UN/ECE Convention on the Transboundary Effects of Industrial Accidents (Helsinki 1992)

### Endamál

Sáttmálin skal fremja vernd og tilbúgving í sambandi við ídnaðarvanlukkur, sum hava árin tvørtur um landamørk. Sáttmálin áleggur londum fráboðanarskyldu um vandamikil tiltøk, sum, um ein vanlukka hendir, kunnu hava skaðilig árin tvørtur um landamørk.

Sáttmálin leggur dent á samstarv, gransking og stuðul millum lond, um vanlukkur henda.

Sáttmálin fevnir ikki um geislaútleiðingar, hernaðarvanlukkur, oljudálkan av havinum o.a.

Sáttmálin hevur skrivstovu í Geneve. Heimasíða: www.unece.org/env/tei_h.htm.

### Støða Føroya

Danmark staðfesti sáttmálan í 1997, men við fyrivarni fyri Føroyar.

Tað er ógreitt, um ídnaðarvanlukkur í Føroyum kunnu hava árin á okkara grannalond og hinvegin. Sostatt er tað eisini ógreitt, um nøkur orsøk er til at seta sáttmálan í gildi.

Hinvegin er spurningurin, um tað ikki hevur týdning fyri Føroyar at fáa fráboðan um vanlukkur í okkara grannalondum, hóast tað kann vera ivingarsamt, um vit verða rakt.

## UN/ECE Convention on Access to Information, Public Participation in Decision-making and Access to Justice in Environmental Matters (Århus 1998)

### Endamál

Sáttmálin snýr seg um umhvørvisrættindini hjá borgaranum. Treytir verða settar um, at myndugleikar samla og spreiða umhvørvisupplýsingar. Sáttmálin eggjar til eina virkna og dagførda upplýsingarskyldu. Sáttmálin leggur dent á, at útleiðingar í umhvørvið frá virksemi, ikki neyðturviliga nýtast at vera handilsloynidómar.

Treytir verða settar um, at almenningurin verður tikin upp í part í sambandi við ítøkiligar avgerðir, sum hava umhvørvisligan týdning, og tá ið ætlanir og politikkur skulu gerast á økinum.

At enda tryggjar sáttmálin møguleikan fyri kæru og avgerð við dómstólarnar.

### Støða Føroya

Tá ið Danmark setti sáttmálan í gildi í 2000, varð fyrivarni tikið fyri Føroyar.

## Convention on Protection of Wetlands og International Importance especially as Waterfowl Habitat(RAMSAR 1971)

### Endamál

Sáttmálin arbeiðir fyri vernd og skilagóðari nýtslu av vátøkjum, orsakað av stóra týdninginum hesi hava fyri javnvágina í vatnskipanunum, og sum livistøð fyri vøkstur og djór. Serstakliga fyri fugl.

At sáttmálanum er knýtt ein protokoll, sum snýr seg um mannagongdir fyri tillagingar av sáttmálanum.

Sáttmálin hevur eitt fylgiskjal, har umleið 1000 vátøki av altjóða týdningi eru listað. Sambært sáttmálanum skulu allir partar tilnevna eitt vátøki at seta í fylgiskjalið.

Skrivstovan hjá sáttmálanum liggur í Gland. Heimasíða: **www.ramsar.org**.

### Støða Føroya

Tað hevur ikki borið til at funnið nakað føroyskt tilfar um, hvørt hesin sáttmálin er galdandi ella ikki. Danska kunngerðin um ígildisetan av sáttmálanum frá 1978 sigur einki um fyrivarni fyri Føroyar ella Grønland. Í apríl 2001 fekk Løgmansskrivstovan ein fyrispurning frá "Skov og Naturstyrelsen" um møgulig vátøkir í Føroyum. Spurningur var bert settur um, hvørji øki vit hava tilnevnt – ikki um vit eru partur av sáttmálanum. Sostatt er sannlíkt, at danska ígildisetanin frá 1978 fevnir um alt ríkið.

## Convention on the International Trade in Endangered Species of Wild Fauna and Flora – CITES (Washington 1975)

### Endamál

Sáttmálin skal tryggja, at altjóða handil við djórum og plantum ikki ger, at hesi verða útruddað.

Í fylgiskjølum til sáttmálan eru listað djóra- og plantusløg, sum antin eru bannað at flyta millum lond, ella sum bert kunnu flytast sambært ávísari góðkenning.

Sáttmálin er víðkaður við tveimum protokollum frá 1979 og 1987.

Sáttmálin verður umsitin í Geneve. Heimasíða: **www.cites.org**.

### Støða Føroya

Sáttmálin er ikki galdandi fyri Føroyar.

## Convention on the Conservation of Migratory Species of Wild Animals (Bonn 1979)

### Endamál

Sáttmálin hevur til endamáls at verja ferðandi djór.

Fylgiskjal 1 listar ferðandi djórasløg, har tað hevur stóran týdning, at verndartiltøk verða framd.

Í teimum londum, sum djórasløgini í fylgiskjali 1 ferðast í, er stórt sæð bannað at veiða hesi djór. Londini skulu friða, og í tann mun tað er gjørligt, endurskapa livistøðini hjá djórasløgunum í fylgiskjali 1. Somuleiðis skulu londini taka burtur ella minka um forðingar hjá teimum ferðandi djórunum í fylgiskjali 1.

Í fylgiskjali 2 eru nevnd djórasløg, har tað er neyðugt við ítøkiligum altjóða avtalum, um sløgini skulu verjast.

Tað eru gjørdar fleiri ítøkiligar avtalur um vernd av djórum, sum eru beinleiðis knýttar at sáttmálanum. Talan er um t.d. um flogmýs, hvalir, vaðfugl osfr.

### Støða Føroya

Sáttmálin um ferðandi djórasløg er settur í gildi fyri Føroyar, men eingin av avtalunum, sum eru knýttar at sáttmálanum, eru settar í gildi.

## Convention on Biological Diversity (1992)

### Endamál

Sáttmálin skal tryggja tað lívfrøðiliga margfeldi.

Sáttmálin hevur ásetingar um, hvat lond skulu samstarva um í altjóða høpi, og hvat lond skulu gera heima hjá sær sjálvum.

Í altjóða høpi skulu lond serstakliga hjálpa menningarlondunum fíggjarliga og tøkniliga at fylgja ásetingunum í sáttmálanum.

Sambært sáttmálanum skulu øll lond gera tjóðarætlanir fyri varðveitan av djóra- og plantusløgum, friða øki av serstakum týdningi og fremja umhvørvisárinsmetingar í sambandi við størri verkætlanir.

Sáttmálin bleiv útbygdur við Cartegena protokollini í 2000. Protokollin snýr seg um vandan av ílegutillaging (genmodifisering) av verum.

Sáttmálin hevur skrivstovu í Montreal. Heimasíða: **www.biodiv.org**.

### Støða Føroya

Føroya løgting góðkendi sáttmálan í 1993.

Løgmansskrivstovan móttók Cartegena protokollina til ummælis í 2000.

## European Landscape Convention (2000)

### Endamál

Sáttmálin skal virka fyri, at lands- og kommunalmyndugleikar fáa í lag politikk og tiltøk fyri vernd, nýtslu og planlegging av lendi í Europa. Sáttmálin fevnir um alt slag av lendi, sum hevur týdning fyri lívsgóðskuna hjá fólki.

### Støða Føroya

Sáttmálin varð sendur Løgmansskrivstovuni til viðmerkingar í desember 1999. Danmark hevur ikki sett sáttmálan í gildi enn.

# FYRISITINGIN

Føroyska umhvørvisverndarlógin kom í gildi tann 01.01.1989. Lógin var fyrireikað av arbeiðsbólki, sum táverandi landsstýrismaðurin, Jóngerð Purkhús, setti í 1986. Lógin var lýst tann 29.11.1989 og hevði táverandi donsku umhvørvisverndarlógina sum leist. Tilmælið nevndarinnar / landsstýrismansins er hjálagt, 4. fylgiskjal.

Við umhvørvisverndarlógini var lóg um heilsusamtyktir frá 1973 sett úr gildi. Hetta hevði við sær, at uppgávurnar, sum tær kommunalu heilsunevndirnar høvdu, vóru fluttar til kommunustýrini at fyrisita. Tann fyrisitingarliga broytingin var tó ikki staðfest fyrr enn í 1994, tá tvær kunngerðir greinaðu uppgávurnar hjá ávikavist kommununum og Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Í lógini um umhvørvisvernd er Heilsufrøðiliga starvsstovan nevnd sum ráðgevi hjá landsstýrismanninum í umhvørvismálum og sum kærumyndugleiki yvir kommunalum avgerðum. Frammanundan var Heilsufrøðiliga starvsstovan sett sum kærumyndugleiki yvir kommunalum heilsunevndum, tá ið yvirheilsunevndin var avtikin miðskeiðis í 1980 árunum. Síðan útdelegeringskunngerðin kom í gildi í 1994, hevur Heilsufrøðiliga starvsstovan fyrisitið umhvørvisverndarmál.

Í viðmerkingunum til uppskotið um eina umhvørvisverndarlóg var víst á, at ”umráðandi er, at umhvørvisdeildin er mannað sama dag, sum lógin verður lýst at koma í gildi. Tá ið umhvørvisdeildin verður sett á stovn, má havast í huga, hvussu deildin skal mannast, umframt hølisspurningur og útbúnaður. Mett verður, at 6 – 8 fólk skulu starvast á umhvørvisdeildini í fyrsta umfari. Av hesum eigur ein at verða løgfrøðingur, ein lívfrøðingur og ein sivilverkfrøðingur. Harumframt 2 – 3 teknikkarar og 1 – 2 skrivarar.”

Á fíggjarlógini øll nítiárini hevur árliga upphæddin til fyrisiting av umhvørvisverndarlógini tó verið undir 1. mió., og hevur fyrisitingin verið avmarkað samsvarandi hesi fíggjarorku. Virksemið er samsvarandi avmarkað sammett við, hvat lógin fyriskrivar skal fremjast.

Í afturvendandi skrivum frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni tey fyrstu árini er gjørt vart við tann stóra munin ímillum lógarinnar krøv og tørvin á fyrisitingarligari orku til tær nógvu uppgávurnar, m.a. verður í ársfrágreiðing frá 1992 sagt, at ”á umhvørvisøkinum er ein sera rúm og drúgv lóg, sum nærum slettis ikki verður umsitin.” Víðari verður mælt til at endurskoða lógina ”við tí fyri eyga at broyta hana samsvarandi teirri fyrisitingarligu orku, vit nú einaferð hava.” Framvegis í dag er sera stórur tørvur á fyrisitingarligari orku ella broyttum regluverki.

Landsstýrismaðurin í umhvørvismál hevur endaliga ábyrgd av málum, sum umhvørvisdeildin viðgerð. Fylgjandi landstýrismenn hava havt ábyrgd av umhvørvismálum síðan løgtingslógin um umhvørvisvernd var sett í gildi:

| | | |
|---|---|---|
| **1985 - 1989** | **Jóngerð Purkhús**, lstm., tj. | *Fíggjar-, búskapar- og umhvørvismál* |
| **1989 - 1991** | **Signar Hansen**, vløgm., tj. | *Orku-, umhvørvis- og skúlamál* |
| **1991 - 1993** | **Svend Aage Ellefsen**, lstm., ff. | *Samferðslu-, umhvørvis- og orkumál* |
| **1993 - 1994** | **Signar á Brúnni**, lstm., tj. | *Umhvørvis-, orku- og kommunumál* |
| **1994 - 1998** | **Eilif Samuelsen**, lstm., sb. | *Umhvørvis-, orku,- skúla- og kommunumál* |
| **1998 -** | **Eyðun Elttør**, lstm., sj. | *Olju- og umhvørvismál* |

Havumhvørvið
Aftrat virkseminum innan umhvørvisverndarlógina hevur umhvørvisdeildin havt eitt ávíst virksemi innan karmarnar av donsku fyriskipanini fyri havumhvørvið. Hendan fyriskipan var samtykt á Føroya løgtingi í 1985. Í fyrru helvt av 1990 árunum var arbeitt saman við Vaktar- og bjargingartænstuni í norðurlendska samstarvinum innan dálkingartilbúgving (Keypmannahavnaravtalan). Somuleiðis hevur umhvørvisdeildin samskipað arbeiðið við at tillaga nýggju donsku havumhvørvislóggávuna til føroysk viðurskiftir. Hendan nýggja fyriskipanin fyri havumhvørvið var samtykt á Føroya løgtingi í 1999.

Við kunngerð heimilað í nýggju havumhvørvisfyriskipanini er virksemið í sambandi við oljuleiting komið undur treytir um umhvørvisgóðkenning, og er umhvørvisdeildin tann fyrisitingarmyndugleiki, sum stendur fyri hesum góðkenningararbeiði. Játtan er fyri gott og væl helvtini av tí fyrisitingarorku, sum er neyðug fyri at røkja fyriskipanina um havumhvørvið, og eru tað viðurskifti í sambandi við leitiboring, sum eru vorðin raðfest til viðgerðar.

Altjóða samstarv og konventiónir
Føroyar luttók seinast í 1980 árunum á Norðsjóarráðstevnum, har avmarking av havdálking var á skránni, og á alheimsráðstevnuni í Rio de Janeiro í 1992. Hesi seinnu árini er luttøkan á norðurlendskum umhvørvisráðharrafundum vorðin rættiliga støðug. Eisini hevur landsstýrismaðurin í umhvørvismálum luttikið á fundi við EU, har norðurlendsku umhvørvismálaráðharrarnir kunnaðu EU-limalondini um støðuna í Arktis og norðurhøvum og um tørvin á umhvørvisverndartiltøkum.

Umhvørvisdeildin hevur luttikið í norðurlendskum umhvørvissamstarvi og innan arktiskt umhvørvissamstarv. Soleiðis hevur borið til at samstarva um umhvørvisverkætlanir og kanningar í føroyskum øki.

Umhvørvisdeildin hevur somuleiðis í ein ávísan mun viðgjørt fyrispurningar viðvíkjandi konventiónum. Hetta er aftaná, at sáttmálin er sendur deildini til ummælis. Tá konventiónsmál eru komin til Føroyar, er sáttmálin vanliga liðugt viðgjørdur og skal samtykkjast/ratifiserast her. Tann viðgerð, sum danskir myndugleikar hava í sambandi við arbeiðið undan eini altjóða avtalu er rættiliga umfatandi. Tá umhvørvisdeildin í einstøkum førum hevur móttikið tilfar til hoyringar, beinleiðis frá donskum myndugleikum, hevur verið ógreitt, undir hvørjum formellum karmum ein viðgerð kann fremjast, og hvørja binding ein meting hevur.

## Ábyrgdarhavandi stýrir

Umhvørvismál hava síðan august 1999 verið heimahoyrandi í Oljumálastýrinum. Skipanin er tann, at umhvørvisverndarlógin, havumhvørvislógin, náttúrufriðingarlógin og aðrar smærri lógir, t.d. viðvíkjandi mold, emballagu og freon eru ábyrgdarøki hjá landsstýrismanninum í umhvørvismálum.

Hvat viðvíkur vernd av náttúrunnar tilfeingi annars, so eru tað ymisk stýri, sum hava ábyrgd av nýtsluni av hesum tilfeingi. Fiskimálastýrið hevur soleiðis ábyrgd av at troyta fiskastovnar og havsúgdjór, og Vinnumálastýrið hevur ábyrgd av veiðu, landbúnaði og aling.

Ábyrgd av vernd og friðing er soleiðis hjá landsstýrismanninum í umhvørvismálum, meðan tann vinnuliga nýtslan av tilfeinginum er hjá øðrum landsstýrismanni. Tó er ávís friðingalóggáva, t.d. av

fugli, hvali, haru o.ø., fyrisitin av Vinnumálastýrinum og Fiskimálastýrinum, ofta sum partur at tilfeingisnýtsluni.

Landsstýrismaðurin í umhvørvismálum hevur ábyrgd av, at byggi- og býarskipanin er soleiðis hátta, at hædd er tikin fyri náttúru- og umhvørvisvernd, men byggi- og býarskipan er annars fyrisitin sum kommunumál.

Ein roynd at greina ábyrgdina av ymiskari umhvørvisligari fyrisiting er í 3. fylgiskjali.

Fyrisitingarskipan
Skipanin innan umhvørvisverndarøkið er býtt í 3 ábyrgdarøkir:
1. Kommunurnar hava ábyrgd av tí lokalu fyrisitingini, umhvørvisvernd og tilbúgving.
2. Heilsufrøðiliga starvsstovan (umhvørvisdeildin) hevur ábyrgd av tí yvirskipaðu fyrisitingini, m.a. dálkandi virkir og kommunalt virksemi og
3. Landsstýrismaðurin hevur ábyrgd av politiskari raðfesting, lóggávu og annars at taka endaliga avgerð í kærumálum.

Innan náttúrufriðing er skipanin heilt øðrvísi. Her er tað ein lokal náttúrufriðingarnevnd, partvíst útnevnd av landsstýrismanninum og undir leiðslu av sýslumanninum, ið tekur avgerðir í málum, sum serliga kommunan letur nevndini til viðgerðar. Avgerðir hjá lokalu náttúrufriðinganevndini verða staðfestar av yvirfriðinganevndini, sum er samansett av føstum limum og partvís landsstýrismannavaldum limum undir leiðslu av dómaraembætinum, sum eisini røkir skrivarastarvið.

Innan byggi- og býarskipanir er tað tann einstaka kommunan, sum hevur ábyrgd av at gera eina byggi- og býarskipan. Hendan skal so latast kommunudeildini á Løgmansskrivstovuni, sum nýtir fakliga ráðgeving frá Vinnumálastýrinum (Landsverkfrøðinginum), og býarskipanin skal síðan staðfestast av settari býarskipanarnevnd. Sambært umhvørvisverndarlóggávuni er tað ásett, at tað skal fara fram ein umhvørvislig staðfesting av byggi- og býarskipanum viðvíkjandi dygdarætlanum og ætlanum fyri staðseting av virksemi.

Innan vernd av djórum o.ø. verða mál, ofta eftir at hava verið reist á løgtingi, tikið til viðgerðar í avvarðandi stýri, og grundað á fakligar metingar frá Fiskirannsóknarstovuni og Náttúrugripasavninum verður friðingaráseting gjørd ella broytt.

## Uppskot til skipan innan náttúru, umhvørvi og planlegging

Niðanfyri sæst ein uppseting av, hvussu arbeiðsbólkurin metir ein skipan av samlaðu umhvørvisfyrisitingini kundi sæð út. Ovasti fyrisitingarligi myndugleiki er landsstýrismaðurin í umhvørvismálum. Aftrat honum er ein miðsavnandi fyrisiting innan náttúru, umhvørvi og planlegging. Eisini eigur landsstýrismaðurin at hava møguleika fyri at lata fakráði/samstarvsráði ella friðinganevndum mál til ummælis, eins og hann kann móttaka umbønir frá hesum ráðum/nevndum. Eisini eigur kommunala fyrisitingin at fyrisita mál innan samlaða náttúru-, umhvørvis- og planleggingarøki.

**Skipan innan náttúru, umhvørvi og planlegging**

**Landsstýrismaður í umhvørvismálum**

**Fakráð/Samstarvsráð:**
- Hoyring av lógum, kunngerðum, reglum og ábøtum

**Friðinganevnd**:
- Hoyring um friðingar, faklig/lokalkend ráðgeving

**Fyrisiting innan náttúru, umhvørvi og planlegging**
- strategi og málsetingar
- lógartilrætting
- altjóða avtalur
- lendisskipanir
- friðing av náttúru og fornminnum
- góðkenning av dálkandi virksemi, kommunalum virkjum og ætlanum
- eftirlit við góðkenningum, kunngerðum og reglum
- kæruviðgerð
- sektorgransking og menning
- kunning

Omanfyrinevndu funktiónir er ábyrgd hjá fyrisitingini, men kunnu plaserast aðrastaðni, t.d. kunnu uppgávur útdelegerast til stovn at røkja.

**Kommunal fyrisiting**
- planlegging av lendisnýtslu
- røkt av lendi og skipanum
- góðkenning til bygging og til virksemi
- eftirlit sambært kunngerðum og reglum
- kæruviðgerð
- kunning

# FYLGISKJAL 1: NÁTTÚRU- OG UMHVØRVISFYRISITING Í ÍSLANDI

### Umhvørvismálastýrið

Íslendska umhvørvismálastýrið varð stovnað í 1990. Fylgjandi lýsing er tikin úr faldara, sum er útgivin um stýrið.

Umhvørvismálastýrið er tað yngsta stýrið í Stjórnarráði Íslands. Við stovnanina av umhvørvismálastýrinum var møguligt hjá myndugleikunum at orða og fremja ein samlaðan umhvørvispolitikk. Tey málsøkir, sum vórðu flutt yvir til umhvørvismálastýrið, vóru áður umsitin av seks ymiskum stýrum.

Síðan stýrið bleiv stovnað, er skipanin av umhvørvismálum nógv broytt. Arbeitt hevur verið við at endurskoða umhvørvislógirnar fyri at tryggja, at hesar eru í tráð við ætlanina um burðardygga menning.

Av teimum týdningarmestu lógunum í  umhvørvismálum kann nevnast: Lóg um náttúruvernd (1999), lóg um heilsu og dálkingarvernd (1998), lóg um landmátingar og kortgerð (1997), Planleggingar og byggingarlóg (1997), lóg um matvørur (1995), lóg um arvabroyttar lívverur (1995), lóg um vernd, friðing og veiðing av villum fugli og villum súgdjórum (1994), lóg um meting av umhvørvisárinum (1993), lóg um upplýsingarveiting og atgongd til upplýsingar í umhvørvismálum (1993) og lóg um Náttúrugripasavn Íslands og lokal náttúrusøvn (1992).

Umhvørvismálastýrið umsitur mál, sum viðkoma náttúru Íslands, náttúruvernd og uttandura virksemi, djóravernd, veiðu av villum djórum, dálkingarvernd, heilsu og matvørur, planlegging og byggingarmál, brunavernd, yvirflóð, landmátingar og kortgerð, umhvørviskanningar og eftirlit og kunningar- og upplýsingarsvirksemi um umhvørvismál.

### Dálkingarvernd

Umhvørvismálastýrið tekur sær av málsøkjum, sum viðkoma vernd ímóti dálking í luft, vatni og landi, spillvatnsviðurskiftir, og málsøkir, sum viðkoma brenning, viðgerð og endurnýtslu av lívrunnum burturkasti, og harumframt økir, sum viðkoma rúsevnum og vandamiklum evnum. Stovnurin innan umhvørvismálastýrið, sum tekur sær av hesum økjum er Hollustuvernd landsins (Heilsufrøðilig vernd landsins).

### Eftirlit og kanningar

Umhvørvismálastýrið hevur ábyrgd av, at regluligar kanningum av umhvørvinum verða gjørdar og skal skipa fyri gransking av náttúru Íslands. Harumframt umsitur umhvørvismálastýrið mál viðvíkjandi skalvalopi og skriðu.

Náttúrugripasavn Íslands er tann stovnurin, sum tekur sær av eftirliti og kanningum av náttúruni í landinum, meðan Veðurstovnur Íslands tekur sær av luftlagnum, rørslu í jarðarskorpuni og yvirflóð, umframt vanliga veðurtænastu. Aðrir stovnar innan umhvørvismálastýrið, sum taka sær av eftirliti og kanningum eru Heilsufrøðiliga vernd landsins, Landmátingar Íslands, Náttúrukanningarstøðin við Mývatn og Veiðueftirlitið.

### Altjóða samstarv

Altjóða samstarv hevur lyklastøðu í umhvørvismálum. Tey flestu umhvørvismálini viðkoma jú fleiri enn einari tjóð, og nógv av málunum viðkoma allari jørðini. Umhvørvismálastýrið tekur sær av fjølbroyttum norðurlandasamstarvi og hevur eftirlit við íverksetanini av umhvørvisverndar-sáttmálum, sum Ísland er partur av. Umhvørvismálastýrið luttekur í umhvørvissamstarvi í nógvum altjóða samtøkum, sum t.d. í Sameindu tjóðum, Evróparáðnum og OECD. Harumframt umsitur umhvørvismálastýrið umhvørvis- og matvøruøkir í sambandi við EØS-sáttmálan. Denturin, sum verður lagdur á arktisk umhvørvismál, er vaksin tey seinastu árini, og starvast Stovnur Vilhjálms Stefánssonar serliga við hesum málsøki. Fleiri altjóða skrivstovur eru staðsettar í Íslandi, t.d. arktisk náttúruvernd (CAFF) og arktisk avumhvørvisvernd (PAME).

### Alment stevnumið

Rio-ráðstevnan um umhvørvi og menning í 1992 er ein tíðarvarði fyri umhvørvismál. Tá samtyktu heimsins lond at arbeiða við at verja umhvørvið og samstundis bøta um vælferðina hjá menniskjanum undir heitinum burðardygg menning. Í Íslandi hevur stjórnin starvast við at seta hesi mál í verk við almennum stevnuorðingum. Ríkisstjórnin samtykti í 1993 stevnuorðingina ”Ávegis til burðardygga menning” við grundarlagi í Rio-samtyktini. Ríkisstjórnin samtykti í 1997 eina víðfevnandi íverksetanarætlan ”Burðardygg menning í íslendska samfelaginum, íverksetanarætlan til aldarmótið”, har roynt verður at leiða sjónarmiðini í burðardyggari menning inn í tey størstu ídnaðarøkini og partar av samfelagnum. Umhvørvismálastýrið umboðar Ísland í nevndini hjá Sameindu tjóðum um burðardygga menning.

### Planleggingar og byggingarmál

Umhvørvismálastýrið tekur sær av planleggingum og byggimálum, meting av umhvørvisárinum, landmátingum og kortgerð. Brunamál vórðu flutt til umhvørvismálastýrið í 1998. Á hesum øki eru málini m.a. at gera eina lendisskipan lidna fyri alt landið, gera lendisnýtsluætlanir, menna lendisupplýsingarskipanir og gera eina digitala kortbasu fyri alt landið. Stovnar hjá umhvørvismálastýrinum, sum taka sær hesum, eru Planleggingarstovnurin, Landmátingar Íslands og Brunaumsjónin.

### Náttúruvernd

Av málunum hjá umhvørvismálastýrinum á hesum øki kunnu nevnast: friðing av landi, landspørtum og djóra- og plantusløgum, umsjón av tjóðargørðum og øðrum friðaðum økjum, djóravernd og tiltøk til at stýra mongdini av villum djórum og burðardygg nýtsla av náttúrutilfeingi, at gera digitala kortbasu yvir gróður, flokka byggiøkir, økja um upplýsingarnar um lívfrøðiliga fjølbroytni og at gera náttúruverndarætlanir og ætlanir um at verja vátlendi, sum hevur altjóða týdning. Umhvørvismálastýrið starvast harumframt við at verja gróður og skógar í samráði við landbúnaðarmálastýrið. Stovnarnir hjá umhvørvismálastýrinum á hesum øki eru Náttúruvernd landsins, Náttúrugripasavn Íslands og Veiðieftirlitið.

### Heilsa og matvørur

Av málum hjá umhvørvismálastýrinum á hesum økinum kunnu nevnast vanligt heilsueftirlit og eftirlit við framleiðslu, innflutningi og spjaðing av matvørum, við tí endamáli at tryggja fólkinum í landinum heilsugóð lívskor. Heilsufrøðilig vernd landsins er tann stovnur hjá

umhvørvismálastýrinum, sum umsitur hesi mál og hevur yvireftirlit við heilsueftirlitinum hjá kommunum.

## Náttúrufriðing og umsiting

Stovnurin hevur til uppgávu at fremja vernd av økjum, villum plantum, djórum og livistøðum.

Stovnurin arbeiðir sambært lóg um náttúruvernd frá 1999. Lógin hevur til endamáls at tryggja verndina av fjølbroyttum liviumstøðum, landsskapum, plantum og djórum í Íslandi. Lógin leggur dent á atgongdina hjá almenninginum til náttúruna og á virðingina fyri náttúruni. Hetta verður gjørt við at tryggja, at samspælið ímillum menniskju og náttúruna ikki leiðir til óneyðugt spill ella dálkan av lívi, jørð, vatni, havi og luft. Lógin skal í mest møguligan mun tryggja, at gongdin í náttúruni fer fram eftir náttúrunnar egnu lógum. Lógin skal somuleiðis tryggja økir, sum hava serstakan søguligan týdning ella serstakt náttúruvirði. Eisini skal lógin tryggja djóra- og plantusløg ímóti afturgongd ella oyðing.

Stovnurin Náttúruvernd Íslands hevur ábyrgdina av dagliga virkseminum innan náttúruvernd. Ábyrgdarøkið er breitt. Stovnurin kann frámæla øllum verkætlanum, sum kunnu órógva náttúruna, og sum hótta serstakar plantur ella djór við týning ella álvarsomum skaða, og er soleiðis við, tá ið avgerðir skulu takast um orkuverk, vegagerð o.l. Stovnurin hevur somuleiðis stýringina av tjóðarparkum og friðaðum økjum um hendi, umframt at hava eftirlitið við friðaðum plantum, náttúrutilfeingi, rekreativum økjum og fornminnum (natural monuments). Stovnurin skúlar og ráðgevur eftirlitsfólki og tekur sær av almennari kunning við blaðútgeving, skúlavitjanum og ígjøgnum fjølmiðlar. Ì dagliga arbeiðinum starvast Náttúruvernd Íslands í tættum samtarvi við lokalar náttúrufriðingarnevndir.

Yvirlit yvir bygnaðin av umhvørvismálastýrinum:



**Stovnar hjá umhvørvismálastýrinum**

Brunaumsjón landsins
Heilsufrøðilig vernd landsins
Náttúrugripasavn Íslands
Náttúrukanningarstøðin við Mývatn
Vilhjálms Stefánssonar stovnur
Veiðieftirlitið
Landmátingar Íslands
Veðurstova Íslands
Planleggingarstovnurin
Náttúruvernd landsins

# FYLGISKJAL 2: NÁTTÚRU- OG UMHVØRVISFYRISITING Í DANMARK

Danska umhvørvismálastýrið var sett á stovn í 1971. Tað var í 1994 lagt saman við orkumálastýrinum og broytti heiti til umhvørvis- og orkumálastýrið.  Fylgjandi lýsing er sett saman av heimasíðuni hjá stýrinum. www.mem.dk

Umhvørvis- og orkumálastýrið er sett saman av einum stýri, 3 stovnum og 3 økisgranskingarstovnum. Harafturat eru serstakar kærunevndir og ráð. Niðanfyri sæst eitt yvirlit yvir bygnaðin.

Yvirlit yvir bygnaðin:




## Departementet
Departementet fungerer som ministerens sekretariat og varetager den overordnede ledelse af ministeriet. Desuden er Landsplanafdelingen en del af departementet.

Landsplanafdelingen
Landsplanafdelingen er en del af departementet og rådgiver ministeren i plansager. Afdelingen administrerer planloven og fungerer som statens faglige enhed for fysisk planlægning.

Den fysiske planlægning fastlægger rammerne for opførelse og anvendelse af bygninger, brug af arealer, anlæg af veje, mm. Miljøhensyn er et væsentligt element i den fysiske planlægning, sammen med bl.a. bevarelse af eksisterende bykvaliteter og landskaber.

I Danmark foregår planlægningen på tre niveauer:

- Lokalt i kommunerne
- Regionalt i amterne
- Nationalt i Miljø- og Energiministeriet

Ministeriet kan gennem regler, landsplandirektiver og information påvirke planlægningen. Placering af vindmøller og højspændingsledninger i landskabet er eksempler på områder, hvor kommuners og amters planlægning påvirkes. Også detailhandelsplanlægning, beskyttelse af Danmarks kyststrækninger og bæredygtig turisme er vigtige opgaver. Landsplanafdelingen koordinerer den statslige behandling af amternes regionplaner.

Efter hvert folketingsvalg udarbejdes en landsplanredegørelse, som beskriver regeringens landsplanpolitiske visioner. Landsplanredegørelsen sendes til offentlig høring, før den afleveres til Folketinget.

Bypolitik

Bypolitik, byernes udvikling og bymiljøet er vigtige arbejdsområder for Landsplanafdelingen. Bæredygtige og levende byer er et mål. Der skal økonomiseres med arealerne til byformål. Herved kan indgreb i natur-, fritids- og landbrugsarealer begrænses. Byomdannelse skal bidrage til at mindske transportbehovet og skabe gode muligheder for miljøvenlige transportformer. Byernes infrastruktur og bygninger skal udnyttes, samtidig med at kvaliteterne i byerne og de fysiske omgivelser styrkes. Et væsentligt indsatsområde er derfor at udvikle den kommunale og regionale planlægning. Afdelingen deltager i EU-Kommissionens arbejde med bæredygtige byer og bymiljø.

Lokal Agenda 21

Sammen med bl.a. Kommunernes Landsforening og Amtsrådsforeningen arbejder Landsplanafdelingen på at få landets amter og kommuner til at gennemføre lokale Agenda 21-handlingsplaner. Lokal Agenda 21 handler om, hvordan den enkelte kommune kan bidrage til en bæredygtig udvikling i det 21. århundrede. En lokal Agenda 21-handlingsplan kan behandle forhold som f.eks. affald, vand, luft, jord, energiforsyning, trafikplanlægning, byplanlægning samt sociale og arbejdsmæssige forhold.

Miljøkonsekvensvurderinger

Landsplanafdelingen varetager ministeriets opgaver med miljøkonsekvensvurderinger (VVM) på det overordnede, strategiske niveau (lovforslag o.lign.) og har det overordnede myndighedsansvar for VVM-reglerne. Reglerne betyder, at større anlæg og projekter, som kan påvirke miljøet i væsentlig grad, skal gennemgå en samlet miljøvurdering og en offentlig høring, før de kan sættes i gang.

Internationalt

Landsplanafdelingen deltager i samarbejdet om fysisk planlægning i EU, herunder udviklingen af et fælles europæisk udviklingsperspektiv. Danmark forsøger bl.a. at fremme synspunkter om bæredygtig udvikling i planlægningen. Landsplanafdelingen deltager også i et internationalt

samarbejde om den fysiske udvikling i henholdsvis Nordsø- og Østersø-områderne, ligesom afdelingen eksporterer know-how på planlægningsområdet.

## Miljøstyrelsen

Miljøstyrelsen hører under Miljø- og Energiministeriet og administrerer blandt andet lovgivningen om miljøbeskyttelse, der skal sikre ren luft, vand og jord og gode levevilkår for mennesker, dyr og natur. Styrelsen overvåger tilstanden i miljøet, rådgiver kommuner og amter og informerer offentligheden om miljøforhold.

Vand, luft og jord
Miljøstyrelsen har ansvar for havmiljøet og for rensning af spildevand. Beskyttelse af grundvand, søer og vandløb er også en central opgave.

Styrelsen arbejder for at nedbringe luftforureningen og stoppe nedbrydningen af ozonlaget. Der arbejdes på at nedbringe forureningen både ved nationale initiativer og ved internationalt arbejde. Miljøstyrelsen administrerer lovgivningen om jordforurening, udarbejder vejledninger og kriterier og står for afprøvning og udvikling af ny teknologi. Indsatsen mod jordforurening sker primært i områder med følsom arealanvendelse og i de særlige drikkevandsområder.

Kemikalier og bekæmpelsesmidler
Brugen af kemiske stoffer og bekæmpelsesmidler reguleres af Miljøstyrelsen. Bekæmpelsesmidler skal godkendes af Miljøstyrelsen, før de importeres, sælges eller bruges, og styrelsen laver regler for klassificering og mærkning af farlige kemiske stoffer og produkter. Styrelsen offentliggør lister over uønskede stoffer for at tilskynde industrien til at anvende miljøvenlige alternativer. Det er målet at reducere brugen af bekæmpelsesmidler og andre problematiske kemikalier — blandt andet gennem en stor international indsats.

Affald og genanvendelse
Miljøstyrelsen administrerer affaldslovgivningen. Målet er at reducere mængderne af affald, udnytte ressourcerne i affaldet bedst muligt og mindske miljøbelastningen. Blandt midlerne for at opnå dette er et forbud mod deponering af brændbart affald og aftaler med brancheorganisationerne om at tage forskellige affaldstyper tilbage.

Renere produkter
Miljøstyrelsen administrerer en tilskudsordning til fremme af renere produkter. Den produktorienterede miljøindsats skal begrænse miljøbelastningen ved at udvikle og afsætte renere produkter, samtidig skal miljø- og erhvervsinteresser kombineres. Målet er at få markedet til at efterspørge renere produkter, få industrien til at producere på en mindre miljøbelastende måde, skifte farlige stoffer ud med mindre farlige stoffer, bruge færre ressourcer og producere mindre affald. Det er den samlede miljøbelastning ved produktion og forbrug af produkter, der skal nedbringes. Midlet er blandt andet analyser af produkters miljøbelastning "fra vugge til grav", såkaldte livscyklusanalyser.

Industrien
Miljøstyrelsen regulerer industriens miljøforhold, herunder luft-, støj- og lugtforurening samt udledning af spildevand. Styrelsen fungerer som klageinstans for de kommunale og amtslige

afgørelser om for eksempel miljøgodkendelser. Desuden holder styrelsen amter, kommuner og industrien løbende orienteret om, hvilke miljøkrav virksomhederne skal leve op til nu og i fremtiden. Miljøstyrelsen arbejder på at fremme miljøstyring og miljørevision i virksomheder.

Transport
Miljøstyrelsen arbejder på at begrænse miljøbelastningen fra transportsektoren. Blandt andet, at der sker en begrænsning af den samlede efterspørgsel efter transport, at der sker en omlægning til mindre forurenende transportformer, og at disse udnyttes mere effektivt. Desuden skal der ske en nedsættelse af miljøbelastningen fra hvert enkelt transportmiddel.

Grøn Fond
Den Grønne Fond og Den Grønne Jobpulje har sekretariat i Miljøstyrelsen. Fonden støtter handlingsorienteret folkeoplysning, der kan påvirke danskernes livsstil. Jobpuljen støtter projekter, der kan fremme skabelsen af nye varige job på miljøområdet.

Internationalt samarbejde
Den internationale dimension af miljøarbejdet står centralt i løsningen af alle Miljøstyrelsens opgaver. Det internationale miljøarbejde formidles gennem en række organisationer som EU, OECD og FN og en række globale miljøproblemer tackles gennem særlige konventioner og aftaler. Styrelsen administrerer miljøstøtteordninger til Øst- og Centraleuropa (DANCEE), det arktiske miljø (DANCEA) og udviklingslande i Sydøstasien og det sydlige Afrika (DANCED). Med ordningerne ydes årligt en stor økonomisk indsats for at forbedre miljøforholdene i disse lande. Miljøstyrelsen arbejder aktivt på at eksportere danske miljøløsninger og miljøteknologi til udlandet. Der samarbejdes med Det Europæiske Miljøagentur, og sammen med Københavns Kommune driver styrelsen Det Europæiske Temacenter for Affald.

## Skov- og Naturstyrelsen

Skov- og Naturstyrelsen arbejder for en bæredygtig forvaltning af Danmarks natur- og kulturværdier i en balance mellem benyttelse og beskyttelse.

Skovene
Via statsskovdistrikterne forvalter Skov- og Naturstyrelsen statens skove, klitter, søer m.v., der i alt udgør ca. 180.000 ha. Den skovbevoksede del er en fjerdedel af Danmarks skovareal. Rammerne for al skovbrug sættes først og fremmest af skovloven, der administreres af Skov- og Naturstyrelsen. Det indebærer bl.a., at styrelsen har tilsyn med de private skove.
Skov- og Naturstyrelsen er Danmarks største træproducent, og styrelsen har en særlig pligt til at praktisere flersidig skovdrift. Udover træproduktionen tilgodeses friluftslivet, kulturminderne samt levesteder for vilde planter og dyr. Skov- og Naturstyrelsen yder tilskud til private skove bl.a. for at fremme disse samfundsinteresser, f.eks. gennem tilskud til at øge naturindholdet, undlade brug af pesticider og til at øge andelen af løvtræ.

Naturen
Naturbeskyttelsens bærende princip er at værne landskabets natur og miljø i respekt for menneskets livsvilkår og for at bevare dyre- og plantelivet. Naturbeskyttelsesloven beskytter søer, enge, vandløb, moser, heder osv. overalt, hvor de findes. Den giver også mulighed for at frede særligt værdifuldt naturområder, begrænse byggeri ved kysterne, oprette natur- og vildtreservater m.v.
Ved at genoprette naturen arbejder Skov- og Naturstyrelsen for at styrke den biologiske mangfoldighed ved at skabe bedre levesteder for planter og dyr, forbedre mulighederne for

friluftslivet og sikre kulturmiljøet. Regulering og tilsyn med vandløb og søer hører også under Skov- og Naturstyrelsen. Og Skov- og Naturstyrelsen står endvidere for miljøreguleringen af landbruget, herunder opfølgningen af vandmiljøplanen, som bl.a. skal reducere udledningen af næringssalte til vandmiljøet.

Bioteknologi
Planter, hvis gener er ændret i laboratorier, så de for eksempel kan klare sig bedre overfor sygdomme eller skadedyr, skal godkendes af Skov- og Naturstyrelsen, før de kan sættes ud i naturen. Det samme gælder genetisk ændrede dyr og mikroorganismer, herunder mikroorganismer i plantebeskyttelsesmidler, de såkaldte biopesticider.

Friluftsliv
Skov- og Naturstyrelsen arbejder for at skabe gode oplevelsesmuligheder i det fri, både i offentligt- og privatejede skove og andre naturområder. I statsskovene arrangeres mange ture og aktiviteter især for børn og unge, og der etableres naturskoler, naturcentre og andre faciliteter for de besøgende. Skov- og Naturstyrelsen står også for uddannelsen af naturvejledere.

Jagt og vildt
Skov- og Naturstyrelsen administrerer jagtloven. Jagttiderne fastsættes under hensyn til vildtet, og hvis der er nedgang i en bestand, kan jagttiden indskrænkes eller bortfalde. Styrelsen udsteder jagttegn, og indtægterne herfra bruges til oplysning og forskning om vildt.

Kulturmiljøet
Skov- og Naturstyrelsen skal sikre de bevaringsværdige kulturmiljøer både i det åbne land og i byerne for at bevare den helhed, der udgøres af landskabet og de spor, som den historiske udvikling har sat. Det gøres gennem planlægningen, og Skov- og Naturstyrelsen er derfor også med til at godkende placeringen af nye veje, vindmøller, højspændingsledninger o.lign.

Fortidsminder
Skov- og Naturstyrelsen har ansvaret for landets ca. 30.000 jordfaste fortidsminder, der alle er fredede. Det er især gravhøje, dysser og ruiner. Styrelsen sørger for, at de bevares, plejes eller restaureres, så de fortsat er en karakteristisk del af landskabet.

Bevaring af bygninger og bymiljøer
Skov- og Naturstyrelsen administrerer bygningsfredningsloven, som skal værne landets ældre bygninger af arkitektonisk og kulturhistorisk værdi. Slotte, herregårde og middelalderlige byhuse er blandt de ca. 9.000 fredede bygninger. Også mindre, beskedne bygninger fredes for at beskrive tidligere tiders levevis, ligesom industribygninger og enkelte nyere, markante bygninger er blevet fredet. Skov- og Naturstyrelsen samarbejder med kommunerne for at skabe tradition for bybevaring, der ikke alene tager hensyn til fredede bygninger. Bymiljøer og bevaringsværdige huse kortlægges og beskrives i kommuneatlas, som kommunerne anvender i byplanlægningen.

Råstoffer
Skov- og Naturstyrelsen skal gennem råstofloven sikre, at indvindingen af råstoffer som sand, grus, kalk, ler og kridt tilrettelægges, så naturen ikke bliver ødelagt og råstofferne rækker længst muligt. Råstofgrave skal efterbehandles, så området igen kan bruges som landbrugsjord eller blive til et naturområde. Havet er også sårbart for råstofindvinding, og her begrænses indvindingen, så miljøpåvirkningen bliver mindst mulig.

Internationalt
Forvaltningen af skovene, naturen og kulturminderne sker også på basis af en lang række internationale aftaler og i samarbejde med internationale institutioner. Skov- og Naturstyrelsen yder også natur- og miljøbistand til andre lande, bl.a. gennem Danced-programmet.

## Energistyrelsen

Energistyrelsen blev oprettet i 1976 og er en styrelse under Miljø- og Energiministeriet. Energistyrelsen beskæftiger sig med områderne produktion, forsyning og forbrug af energi og skal på statens vegne sikre, at energiudviklingen i Danmark sker på en forsvarlig måde både samfundsmæssigt, miljømæssigt og sikkerhedsmæssigt. Energistyrelsen varetager administrationen af den danske energilovgivning og gennemfører analyser og vurderinger af udviklingen på energiområdet. En vigtig opgave er at følge op på regeringens energipolitik. En hovedopgave er at tilrettelægge rammer for energisektoren, der sikrer, at de langsigtede hensyn kan varetages effektivt. Forsyningssikkerheden skal sikres og miljøbelastningen minimeres.

Effektiv energiforsyning
Energistyrelsen har ansvaret for den overordnede planlægning af Danmarks el-, varme- og naturgasforsyning og administrerer love om elforsyning, varmeforsyning og naturgasforsyning.

Indvinding af olie og naturgas
Danmark er i dag selvforsynende med olie og gas fra den danske Nordsø. Energistyrelsen fører tilsyn med indvindingen af olie og gas i den danske undergrund, herunder spørgsmål, der vedrører naturgaslagre, sikkerhed og arbejdsmiljø. Styrelsen udarbejder også prognoser og udsteder koncessioner til efterforskning og indvinding. Energistyrelsen administrerer undergrundsloven, der har med udnyttelse af den danske undergrund at gøre. Det gælder både olie- og gasindvinding, saltproduktion, geotermisk energi og oplagring. Herudover administrerer styrelsen love vedrørende havanlæg, rørledning og kontinentalsoklen.

Renere brændsler og vedvarende energi
Udviklingsprogrammet for Vedvarende Energi (UVE) administreres af Energistyrelsen og spiller en central rolle for den teknologiske udvikling, der skal sikre en øget anvendelse af vindkraft, bioenergi, solenergi, bølgeenergi med videre.

Energibesparelser
Energistyrelsen arbejder for at få både borgere, erhvervsliv og offentlige institutioner til yderligere at effektivisere deres energiforbrug, så der kan opnås besparelser. Energistyrelsen administrerer også en ordning fra 1997, hvorefter alle bygninger skal energimærkes, så køber kender en boligs energitilstand ved en ejendomshandel. Desuden er der indført systematisk energistyring i hovedparten af de offentlige institutioner, og energisynskonsulenter tilskynder erhvervslivet til at spare på energien gennem energisynsordninger. Energistyrelsen udarbejder årligt rammerne for elsparefonden, som blev oprettet i 1997 og administreres af en selvstændig bestyrelse. Fonden har til formål at øge og effektivisere elbesparelsesindsatsen og giver bl.a. tilskud til elvarmekonvertering i kollektive forsyningsområder.

De grønne afgifter

Erhvervslivet er i 1996 blevet omfattet af nye love om grønne afgifter. Afgiftsprovenuet skal tilbageføres til erhvervslivet. Det sker bl.a. ved at erhvervsvirksomheder kan indgå aftaler om energieffektiviserende foranstaltninger, som bevirker, at de får en del af CO2-afgiften retur. Erhvervslivet kan endvidere opnå tilskud til energibesparelser gennem CO2-tilskudsordningen. Under denne ordning findes en bred vifte af muligheder for tilskud, bl.a. tilskud til standardløsninger, som let kan søges af alle erhvervsvirksomheder. Der kan også søges om tilskud til f.eks. udviklingsprojekter, informationsprojekter m.v. Energistyrelsen administrerer denne lovgivning om aftaler og tilskud. To brancheopdelte erhvervskontorer indgår aftaler med erhvervslivet om energieffektiviseringer og behandler ansøgninger om tilskud til energibesparelser m.v. i erhvervsvirksomheder. Desuden varetager kontorerne generelle opgaver i forbindelse med erhvervslivets energiforbrug og -besparelser.

Energiforskning
Energistyrelsen administrerer Energiforskningsprogrammet EFP, der yder tilskud til forskning og udvikling inden for en række vigtige fagområder. Det gælder f.eks. yderligere indvinding af olie- og naturgas, forbrænding og forgasning af biomasse, udvikling af store og støjsvage vindmøller, og forskning i brændselsceller og superledere.

Internationalt samarbejde
Energistyrelsen spiller en aktiv rolle i det internationale energipolitiske samarbejde inden for FN, OECD, IEA, EU og Nordisk Ministerråd. Energistyrelsen søger at fremme danske virksomheders eksport af energiteknologi og know-how og deltager i systemeksportprojekter. Desuden bidrager styrelsen via forskellige støtte- og bistandsprogrammer til at overføre viden og teknologi til de central- og østeuropæiske lande og ulandene. Det sker både gennem Danced og Danidas miljøbistand.

## Danmarks Miljøundersøgelser

Danmarks Miljøundersøgelser (DMU) er en selvstændig forskningsinstitution i Miljø- og Energiministeriet. DMU’s formål er at tilvejebringe et fagligt grundlag for de miljøpolitiske beslutninger. DMU udfører faglig rådgivning, overvågning af natur og miljø samt anvendt og strategisk forskning. Omkring 40% af DMUs udgifter dækkes af indtægter fra program- eller kontraktforskning.

Forskning
DMU gennemfører både anvendt forskning, der retter sig mod at afhjælpe specifikke miljøproblemer, og langsigtet, strategisk forskning. Forskningsprojekterne understøtter den faglige rådgivning og overvågningen.

Overvågning
DMU gennemfører overvågning for at vurdere effekten af politisk administrative foranstaltninger og for at skabe et overblik over udviklingen, så miljøproblemer kan forudsiges og udpeges så tidligt som muligt.

Faglig rådgivning
DMU rådgiver Miljø- og Energiministeriet, andre offentlige myndigheder, private organisationer og virksomheder. Rådgivningen udføres både i form af analyser, udredninger, besvarelse af henvendelser og ved at DMU’s medarbejdere deltager i kommissioner og udvalg.

Formidling
DMU formidler sine resultater igennem forskellige kanaler, der spænder fra videnskabelige artikler i internationale tidsskrifter over faglige rapporter og tekniske anvisninger til populærfaglige indlæg i massemedierne. DMU udgiver et kvartalsvis nyhedsbrev. Desuden formidler DMU viden gennem medarbejdernes deltagelse i møder og kongresser.

## Danmarks og Grønlands Geologiske Undersøgelse
Danmarks og Grønlands Geologiske Undersøgelse (GEUS) er en sektorforskningsinstitution under Miljø- og Energiministeriet med status af statsvirksomhed. Formålet med GEUS virksomhed er at opbygge, anvende og udbrede viden om de materialer, processer og sammenhænge, der er af betydning for udnyttelsen og beskyttelsen af de geologiske værdier i Danmark og Grønland.

Under dette formål er defineret to opgaver. GEUS er således dels ansvarlig for at varetage geologisk kortlægning, dataindsamling og datalagring vedrørende Danmark og Grønland, og dels skal GEUS løse forsknings-, rådgivnings-, overvågnings- og formidlingsopgaver.

Som sektorforskningsinstitution varetager GEUS de nævnte opgaver med særligt sigte på at sikre det bedst mulige geovidenskabelige grundlag for Miljø- og Energiminsteriets forvaltnings- og lovgivningsarbejde.

I praksis omfatter GEUS arbejdsfelt især forureningsspørgsmål, vandindvinding, råstofefterforskning og udnyttelse, naturbeskyttelse samt forskning i forbindelse hermed.

## Forskningscentret for Skov & Landskab
Forskningscentret for Skov & Landskab (FSL) er en selvstændig sektorforskningsinstitution under Miljø- og Energiministeriet.

FSL udfører forskning, udvikling og rådgivning samt formidler viden inden for hovedområderne skovdrift, skovøkologi, pyntegrønt, park og landskab, by- og landsplanlægning samt friluftsliv og turisme. Resultaterne er rettet mod en praktisk anvendelse i de pågældende sektorer, hvor de skal danne grundlag for en bæredygtig og flersidig forvaltning.

# FYLGISKJAL 3: VERANDI ÁBYRGDARSKIPAN INNAN UMHVØRVISTÝÐANDI FYRISITING

Fylgjandi yvirlit er ein roynd hjá arbeiðsbólkinum at fáa yvirlit yvir verandi ábyrgdarskipan innan umhvørvistýðandi fyrisiting:

**Landsstýrismaður:**
Umhvørvi / Vinnu / Mentan / Fisk / Løgmaður

**Stýrið:**

| OMS | VMS | FMS | MMS | LMS |
|---|---|---|---|---|
| - umhvørvisvernd | - veiðulógir | - fiskur | - gransking | - byggilóggáva |
| - havumhvørvið | - ræning | - hvalur | - savnrøkt | - kommunur |
| - náttúrufriðing | - landbúnaður | | - undirvísing | - altjóða samskipan |
| | - skóðfriðing | | | |
| | - matvørur | | | |
| | - produktir | | | |
| | - brunalóg | | | |
| | - djóravernd | | | |
| | - ferðavinna | | | |
| | - arbeiðaravernd | | | |
| | - lendisupptekning | | | |
| | - veðurlagsskráseting | | | |
| | - orka | | | |
| | - aling | | | |
| | - vatnnýtsla | | | |
| | - mineralir | | | |
| | - vegir og lendingar | | | |

**Stovnar:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Jarðfrøðisavnið | Heilsufr. Str. | V&B | Náttúrugripasavnið | |
| | Jarðaráðið | Fiskirann. | Fornminnisavnið | |
| | Landsverkf. | | Fróðskaparsetrið | |
| | Skógrøktin | | | |
| | Matrikulstovan | | | |
| | Arbeiðseftirlitið | | | |
| | Apoteksverkið | | | |

**Lokalt:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Kommunur | Kommunur | | | Kommunur |
| Náttúrufriðinganevndir | | | | |

# FYLGISKJAL 4: VIÐMERKINGAR TIL UPPSKOT TIL LØGTINGSLÓG UM UMHVØRVISVERND

HS 603-20010336-1

\- 1 -

**Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um umhvørvisvernd.**

Tørvurin á eini føroyskari umhvørvisverndarlóg hevur verið støðugt vaksandi og nógv umrøddur seinastu árini. Landsstýrið setti tí við ársbyrjan 1986 ein arbeiðsbólk at gera uppskot til eina slíka.

I arbeiðsbólkinum komu at sita:

Jórun í Dali, arkitektur, fyri Føroya náttúru- og umhvørvisverndarfelag,
Marjun Hanussardóttir, deildarleiðari, seinni
Ásmundur Guðjónsson, fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna,
Øssur av Steinum, løgtingsmaður, fyri Føroya Kommunufelag,
Tóri í Hoyvík, býargartnari, fyri Tórshavnar kommunu,
Justinus Olsen, djóralækni,
Mogens Nepper Christensen, fúti, seinni
Finn Dugaard, varafúti, fyri Føroya Landfúta og
Høgni Debes Joensen, landslækni, ið varð valdur til formann

Sum skrivara hjá bólkinum setti landsstýrið Trygva Jacobsen, advokat.

Fyrsti fundur hjá arbeiðsbólkinum var 12. mars 1986 og hevur bólkurin, nú arbeiðið er lokið, hildið tilsamans 35 fundir.

\- 2 -

Arbeiðsbólkurin samdist um at brúka eina av norðurlendsku umhvørvisverndarlógunum sum grundarlag í arbeiðnum at gera eina føroyska, og varð danska umhvørvisverndarlógin kosin til hetta endamál.

Nógvar broytingar eru í tekstinum í mun til donsku lógina. Til dømis eru um leið helmingurin av greinunum í donsku lógini heilt ella lutvíst strikaðar í uppskotinum.

Í aðrar mátar eru fleiri broytingar gjørdar, ið standast av, at føroyska og danska samfelagið eru ólík, tá ið tað snýr seg um eitt nú fólkatal, kommunuskipan, jarðfrøðislig viðurskifti, slag av vinnulívi og umhvørvi.

Uppskotið er ein heimildar- og rammulóg, ið er soleiðis tillagað, at landsstýrið kann áseta reglur um burturkast, djórahald og onnur viðurskifti, tá ið hetta er neyðugt til fyribyrgingar og basing av óheilsufrøðiligum viðurskiftum ella tíðandi ampum fyri umhvørvið. Somuleiðis verður landsstýrinum heimilað til fyribyrging av dálking at áseta reglur eitt nú fyri dálking frá virkjum, reinsivirkjum, ruskplássum, vandamiklum tilbúningum v.m. Landsstýrið kann sambært uppskotinum gera ásetingar um krøv um dygd á yvirflatuvatni, luft, jørð, strondum og sjógvi.

Uppskotið ber í sær, at ein umhvørvisdeild verður skipað sum ein deild á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Deildin tekur avgerð sum fyrsti myndugleikin í flestu málum sambært hesa lóg. Hon skal virka sum ráðgevi landsstýrisins og hjá øðrum myndugleikum viðvíkjandi spurningum um umhvørvisvernd. Deildin skal geva landsstýrinum tilmæli um ásetan av ymiskum fyriskipanum við heimild í lógini. Somuleiðis skal deildin kunna seg um dálkingarviðurskiftini kring landið og verða ansin um framkomu av nýggjum dálkingarkeldum. Eisini skal umhvørvisdeildin ansa eftir, at lógin verður hildin, at avgerðir um boð ella forboð verða lýddar og at treytir, ásettar í sambandi við góðkenningar, verða hildnar.

Kommunurnar skulu sambært uppskotinum antin sjálvar ella saman við umhvørvisdeildini gera ætlanir fyri, hvussu frálopsvatn skal fáast burtur, her uppi í reglur viðv. reinsiverkum v.m. Í lógaruppskotinum eru reglur um, hvussu kortlegging og planlegging verður framd við atliti til dálkingarkeldur. Hetta arbeiði skal gerast av komm-

- 3 -

unalu myndugleikunum saman við umhvørvisdeildini.

Avgerðir, ið kommunurnar taka við heimild í lógini, kunnu kærast til umhvørvisdeildina.

Í uppskotinum er ásett, at ein umhvørviskærunevnd verður sett á stovn sum kærustovnur. Til hesa nevnd kunnu kærast tær avgerðir, ið umhvørvisdeildin tekur avgerð um sum fyrsti myndugleiki.

Tá ið lógin er samtykt eiga beinanvegin reglur at verða gjørdar viðvíkjandi góðkenningarskipanini við heimild í grein 33, um burturkast, djórahald, skaðadjór, skaðaplantur v.m. við heimild í grein 4 til 6 og um mál viðv. spillvatni við heimild í grein 17. Hetta er ein fyritreytin fyri, at lógin kann fara at virka eftir ætlan.

Umráðandi er, at umhvørvisdeildin er mannað sama dag, sum lógin verður lýst at koma í gildi. Tá ið umhvørvisdeildin verður sett á stovn má verða havt í huga, hvussu deildin skal mannast umframt hølisspurningurin og útbúnaður. Mett verður, at 6 - 8 fólk skulu starvast á umhvørvisdeildini í fyrsta umfari. Av hesum eigur ein at vera løgfrøðingur, ein lívfrøðingur og ein sivilverkfrøðingur. Harumframt 2 - 3 teknikarar og 1 - 2 skrivarar.

Umhvørvisdeildin er ætlað, tá ið hugsað verður um virkisøkið hjá stovnunum, at hava eitt neyvt samstarv við landsverkfrøðingsstovnin og arbeiðseftirlitið við serligum atliti til kortleggingararbeiðið og ávísar mátingar av dálking.

Lógin eigur, eini 2 - 3 ár eftir, at hon er sett í gildi, at verða endurskoðað við atliti til broytingar í mun til tær royndir, ið eru vunnar hetta tíðarskeið.

Arbeiðsbólkurin hevði 14. - 16.11.87 eftir avtalu við landsstýrið 4 fundir við tvey umboð frá danska umhvørvisstýrinum, Jørgen Bierring, skrivstovustjóra og Aase Kougshede. Uppskotið til føroyska lóg um umhvørvisvernd var saman við fylgisskjali og viðmerkingum gjøgnumgingið saman við nevndu umboðum.

- 4 -

## Viðmerkingar til tey einstøku kapittlini.

### 1. Kapittul

1. kapittul greiðir í almennum vendingum frá, hvat endamál lógin hevur, og hvat hon umfatar.

Endamálið er at fyribyrgja og minka um alt slag av dálking, uttan mun til, hvar hon kemur fyri. Lógin skal sostatt nýtast til at tryggja eginleikar í náttúruni, sum hava týdning fyri fólk og náttúruna sjálva. Harumframt skal lógin nýtast til at fáa til vega neyðugar kanningar, sum skulu verða grundarlag undir fyrisitingini av lógini.

I hesi lóg kann dálking vera:

- førningur av føstum, flótandi ella luftvorðnum evnum til luft, jørð, vatn ella sjógv
- óljóð og ristingar
- ljós og onnur geisling
- hitaávirkan.

Sum dálking er eisini at skilja alt, sum kann elva til, at áður elvd dálking førir við sær øktan skaða ella ampa.

I sjálvum lógartekstinum er eingin allýsing gjørd av hugtakinum dálking av teirri orsøk, at dálking í framtíðini eisini kann koma at fevna um dálkingarfyribrygdi, vit ikki kenna til í dag. Men í viðmerkingunum er tó allýst dálking í dagsins merking.

Lógin fevnir um alt virksemi, sum kann elva dálking.

Hetta setir ávísar treytir til tey, sum ætla sær undir virksemi, sum nevnt er omanfyri. Tey hava skyldu at bera so í bandi, at virksemi dálkar sum minst, at staðið er valt á skynsaman hátt v.m. Fyri flestu virki eru krøvini meira ítøkiliga lýst í kap. 5.

Lógin byggir á tað grundsjónarmið, at persónar ella virki ið dálka, skulu gjalda fyri tey tiltøk ímóti dálking, ið eru neyðug.

- 5 -

## 2. Kapittul

2. kapittul fevnir um vanligar reglur og heilsufrøðiligar staðfestingar, um rottutýning og um heimildirnar hjá Føroya Landsstýri at gera reglugerðir um dálking frá virkjum, um brennievni og maskinur, um vandamikil evnir og vandamiklan flutning, og eisini um innflutning av ivasomum evnum, um havna- og vegagerð, óljóð o. s. fr.

Tær í 2. kapitli nevndu reglur og heilsufrøðiligu staðfestingar skulu avloysa núverandi heilsusamtyktirnar. Ein bági við standardheilsusamtyktunum er, at tulkingin av teimum er misjøvn frá kommunu til kommunu.

§§ 4 og 6 fevna um nýggjar heilsuligar meginreglur, sum heimila Føroya Landsstýri at gera reglugerðir, ið eru eins fyri alt landið. Aðrir partar av heilsusamtyktini koma undir aðra lóggávu, t.d. matvørulógina.

Lógin fer at geva Føroya Landsstýri heimild at geva umhvørvisdeilini víðkaðar møguleikar at virka fyri at fremja fyribyrgjandi og bráfengis tiltøk móti óheilsusomum viðurskiftum. Eisini verður heimilað at áseta markvirðir.

Dentur verður lagdur á, at lógin eisini skal fevna um skaðaplantur, ið kunnu flyta plantusjúkur til landið.

## 3. Kapittul

Hesin kapittul snýr seg um vatnveitingaráhugamál, her uppi í verjuøkir, boð og forboð í sambandi við slík. Tá ið umhvørvisdeildin gevur loyvi til, at eitt vatnveitingarvirki tekur vatn frá áum, løkum, keldum ella vøtnum, kann verða skipað fyri einum verndarøki rundanum virkið, har tað ikki er loyvt at reka vinnulívsvirki, stovnar, kampingpláss ella tílíkt, ið kann dálka vatnveitingarøkið.

## 4. Kapittul

Hesin kapittul snýr seg um vernd av omanávatni. Í hesi lóg er omanávatn, vatn í løkum, áum, vøtnum og føroyskum sjóøkið. Sum

- 6 -

heild er ikki loyvt at dálka hetta ella goyma dálkandi evni nærhendis.

Landsstýrið kann geva undantaksloyvi hesum viðvíkjandi.
Restin av kapitlinum snýr seg um, at kommunum verður álagt at gera eina ætlan fyri, hvussu frálopsvatnið skal fáast burtur, her uppi í reglur viðvíkjandi privatum reinsiverkum, útreiðslum, viðgerð og rakstri av almennum og felagsprivatum reinsiverkum, ognartøku o.ø.

5. Kapittul

Hesin kapittul verður mettur sum sera týdningarmikil í lógini.

Góðkenningarmyndugleiki er umhvørvisdeildin, sum eisini umsitur og skipar fyri eftirlitinum.

Grundreglan í góðkenningarskipanini er, at ávís serliga dálkandi virki o.t. skulu hava eina góðkenning, áðrenn farið verður undir gerð,broyting ella víðkan av slíkum.

Hjálagt lógini er sum fylgiskjal ein listi. Hesin listi fevnir um virksemi, virki, útbúnað og innrættingar, ið koma inn undir umrøddu góðkenningarskipan. Listin er gjørdur við atliti til føroysk viðurskifti.

Lógin tilskilar, at landsstýrið skal áseta reglur um, at verandi fyritøkur, virkir og útbúnaðir, ið nevnd eru í fylgiskjalinum, skulu søkja um góðkenning innan eina nærri ásetta freist.

6. Kapittul

Kapittulin lýsir umhvørvisdeildina og hennara uppgávur mótvegis landsstýrinum og øðrum myndugleikum.

7. Kapittul

Umhvørvisdeildin hevur eftirlitið við, at lógin verður hildin.
Føroya Landsstýri kann áleggja øðrum stovnum at luttaka í eftirlitinum.

- 7 -

Eftirlitið hevur atgongd til neyðugar upplýsingar. Upplýsingarskyldu hevur tann, ið ábyrgdina hevur. Avvarðandi kann verða álagt at senda royndir til kanningar.

Føra rakstrartrupulleikar ella annað við sær týðandi dálking ella vanda fyri slíkari, skal tann, ið ábyrgdina hevur, beinan vegin geva eftirlitsmyndugleikunum boð.

8. Kapittul

Kapittulin snýr seg um løggilding av privatum starvsstovum.

9. Kapittul

Hesin kapittul snýr seg um kortlegging av dálkingarstøðuni í Føroyum, sum hon verður framd av umhvørvisdeildini í samstarvi við kommunalu myndugleikarnar.

Kortleggingin skal nýtast sum grundarlag undir planlegging - bæði á lands- og kommunustigi. Planleggingin skal umfata dygdina á øllum viðkomandi recipientum umframt burturkast.

Reglurnar um burturkast fevna um alt slag av burturkasti, eisini spilloljú, kemikaliir, sjúkrahúsburturkast og tílíkt.

10. Kapittul

Sum áður nevnt verður á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni skipað ein umhvørvisdeild.

Í hesum kapitttuli verður ásett, hvussu farast skal fram, tá umhvørvisdeildin tekur sínar avgerðir.

Ásett verður:

at vanliga skal fráboðast skrivliga til tann ella tey, sum varða av, um avgerðir deildarinnar.

at avgerðirnar samstundis verða fráboðaðar landslæknanum, øðrum avvarandi myndugleikum, privatpersónum, sum mugu ætlast at hava einstaklinga, týðandi áhuga fyri avgerðini og feløgum, sum hava kærurætt,

at fráboðanin skal tilskila tær meginætlanir, ið hava ligið til

- 8 -

grund fyri avgerðini, til hvønn myndugleika kærast kann til og kærufreistina.

11. Kapittul

Hesin kapittul ásetur tær vanligu reglurnar um kæru, her uppi í kærufreistina og týdning hennara.

12. Kapittul

Hesin kapittul snýr seg um kæru av avgerð kommununar til umhvørvisdeildina, sum hevur endaligu avgerðina.

13. Kapittul

Settur verður á stovn nýggjur kærustovnur - umhvørviskærunevndin.

Ásett verður:
- hvørjar avgerðir kunnu kærast til umhvørviskærunevndina,
- hvør kann kæra til nevndina,
- hvussu nevndin er skipað, og hvussu avgerðirnar verða tiknar.

14. Kapittul

I hesum kapitli eru ásettar revsireglur, at landsstýrið ásetur, nær lógin fær gildi, og hvørjar lógarreglur verða settar úr gildi beinanveg ella seinni.